**Innihaldsyvirlit**


**PARTUR I** ..... 5

**FRAMLØGA LØGMANS** ..... 5

**PARTUR II** ..... 15

**STJÓRNAR- OG UTTANRÍKISMÁL** ..... 15
- VISJÓN 2015 ..... 15
- ÚTFLUTNINGSFRAMI ..... 15
- SJÁLVSTÝRISMÁL ..... 15
- STJÓRNARSKIPAN ..... 16
- SAMSTARVIÐ Í NORÐURLANDARÁÐHARRARÁÐNUM ..... 16
- ALTJÓÐA HANDILSPOLITISK MÁL ..... 16
- ALTJÓÐA TILFEINGISMÁL ..... 17
- ALTJÓÐA MENNINGARSAMSTARV ..... 17
- MARKNAMÁL ..... 18
- TRYGDARPOLITISK MÁL ..... 18
- SENDISTOVUR ..... 18

**FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL** ..... 19
- BÚSKAPARGONGD ..... 19
- EINSKILJINGAR ..... 19
- BRUTTOTJÓÐARÚRTØKA ..... 20
- FÓLKATAL ..... 20
- ARBEIÐSLOYSI ..... 21
- BRÚKARAPRÍSTAL ..... 21
- INNFLUTNINGUR AV VØRUM ..... 21
- ÚTFLUTNINGUR AV VØRUM ..... 22
- HANDILSJAVNI ..... 23
- OGN OG SKULD UTTANLANDS ..... 23
- EFTIRLØNARMÁL ..... 23
- MÁL- OG AVRIKSSTÝRING ..... 23

**FISKIVINNU- OG SJÓVINNUMÁL** ..... 24
- FISKIDAGAR OG HJÁVEIÐA ..... 24
- LÓG UM VINNULIGAN FISKISKAP ..... 24
- MILLUMLANDASAMSTARV OG SAMRÁÐINGAR UM FISKIVINNUMÁL ..... 24
- SAMRÁÐINGAR OG AVTALUR FYRI 2006 ..... 25
- HVALAVEIÐUMÁL ..... 27
- FISKIVINNUGRANSKING ..... 27
- FØROYA ALTJÓÐA SKIPASKRÁSETING (FAS) ..... 27
- TILBÚGVING ..... 28
- SKIPAEFTIRLIT ..... 28

**VINNUMÁL** ..... 28
- VINNULÓGGÁVA ..... 29
- ALING ..... 29
- LANDBÚNAÐUR OG MATVØRULÓGGÁVA ..... 29
- TRYGGING ..... 29
- VINNUGRANSKING ..... 30
- ÆTLAN FYRI ÍVERKSETAN ..... 30
- MARKNAÐARFØRING AV FØROYUM SUM FERÐAMANNA- OG ÍLØGULAND ..... 31

Samferðsluætlan ..... 31
Nýggj havnalóg ..... 31
KT-nýtsla ..... 31
Ferðslutrygd ..... 32
Olja og orka ..... 32
Arbeiðsmarknaður ..... 32

**Mentan, undirvísing og gransking ..... 33**
Fólkaskúli ..... 33
Sernámsfrøði ..... 34
Miðnámsútbúgvingar ..... 34
Skúlabygging ..... 34
Hægri lestur og gransking ..... 35
Útbúgvingarstuðul ..... 35
Mentan ..... 35
Musikkskúli ..... 36
Fólkakirkja ..... 36
Norðurlendskt mentanarsamstarv ..... 36

**Almanna- og heilsumál ..... 36**
Visjónir, mál og mið ..... 36
Vælferðarráð ..... 37
Familjupolitisk átøk ..... 37
Eldrapolitisk átøk ..... 37
Bústaðarpolitisk ætlan ..... 38
Rehabilitering ..... 38
Rúmligur arbeiðsmarknaður ..... 38
Sjúkrahúsverk ..... 38
Heildarpsykiatri ..... 39
Fólkaheilsa ..... 39
Barnaverndarlóg ..... 40
Heimleys ..... 40
Sjúkrakassalóg ..... 40
Talgilding á almanna- og heilsuøkinum ..... 40
Ílegusavn ..... 40
Apoteksverk ..... 41

**Innlendismál ..... 41**
Útlendingamál ..... 41
Tinglýsing ..... 41
Landsfólkayvirlit ..... 42
Fjølmiðlaábyrgdarlóg ..... 42
Navnalóg ..... 42
Vallóg ..... 42
Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ..... 42
Familjurættarlóggáva ..... 43
Útoyggjamál og Strandfaraskip landsins ..... 43
Kunngerðablað og kunngerðasavn ..... 43
Umhvørvismál, lendismál og náttúrumál ..... 43

**PARTUR III** ........ **45**

**LØGLISTI** ........ **45**
LØGMANSSKRIVSTOVAN ........ 45
FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ ........ 45
FISKIMÁLARÁÐIÐ ........ 47
VINNUMÁLARÁÐIÐ ........ 48
MENTAMÁLARÁÐIÐ ........ 49
ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ ........ 50
INNLENDISMÁLARÁÐIÐ ........ 52

# PARTUR I

## Framløga løgmans

Harra formaður.

Løtan við skrúðgongu, gudstænastu og kórsangi kennist tignarlig. Tjóðin øll steðgar á og fer úr gerandishaminum. Vit kenna felagsskapin so veruligan - kenna, at vit eru partur av sama samleika. Ivaleyst ásanna vit øll, at tað er ein framíhjárættur at vera borgari í hesum samfelag, sum er okkara, og sum vit øll eru so ómetaliga góð við. Hetta er góður førningur at hava við sær á ferðini, nú vit gerast alt meira partur av alheiminum.

Hóast ein hevur verið við í mong ár, so kennir ein framvegis hátíðina so ítøkiliga, tá ið farið verður oman í dómkirkjuna – nú fyri seinastu ferð í eina danska kirkju. Tú kennir ylin fara ígjøgnum teg, tá ið kórsangurin tekur at ljóma á Tinghúsvøllinum. Og soleiðis kennist eisini henda løtan, har eg fyri triðju ferð skal bera ólavsøkurøðuna fram.

Men samstundis ber hetta boð um, at fjørðurin hjá sitandi samgongu er meira enn hálvrógvin. Vit standa á gáttini til okkara seinastu heilu tingsetu í hesum valskeiði, og hóast vit hava rokkið nógv av setningini okkara, so eru enn mong týdningarmikil mál at avgreiða.

Vit løgdu fyri í 2004 við at siga, at vit ynsktu at skapa álit og arbeiðsfrið, tí hetta var fyritreytin fyri, at vit kunnu røkka úrslitum. Hetta vísti seg at bera til.

Vit ynsktu at fáa vent búskapargongdini við at reka ein varnan, men tó arbeiðsstimbrandi búskaparpolitikk, og alt bendir á, at hetta hevur eydnast.

Vit vildu fáa viðurskiftini í sjálvstýrismálinum á føroyskar hendur, so at framtíðar tilgongdin skuldi liggja í hondunum á Føroya fólki og hesum høga tingi. Hetta er eisini komið í rættlag.

Tað kennist hugaligt, men lat tað vera okkum ein íbirtari til ikki at setast hendur í favn, men at halda áfram og greiða tey mongu týdningarmiklu málini, sum krevja skilagóðar loysnir. Og til hetta arbeiðið hava vit brúk fyri øllum góðum kreftum, eisini frá andstøðuni.

Harra formaður.

Tað stendur væl til í Føroyum.

Okkara búskapur er vorðin betri seinasta árið, og útlitini eru í løtuni bjørt fyri land okkara. Vit fegnast um, at arbeiðsloysið er sera lítið – minni enn í flestu Norðurlondum og í ES. Inntøkurnar í landskassan vaksa, samstundis sum Landsstýrið, eins og vit lovaðu, hevur givið skattalætta, sum stimbrar hugin at arbeiða og harvið eisini búskapin. Lønarútgjaldingarnar eru øktar. Tað gongur væl í flestu pørtum av okkara vinnulívi. Trygga politiska støðan skapar álit, sum saman við einum skynsomum búskaparpolitikki gevur dirvi og trúgv upp á framtíðina.

### Familju- og bústaðarpakki

Hóast búskaparstøðan er góð, so eru tað enn tíverri tey, ið ikki hava nóg góðar fíggjarligar umstøður.

Vit síggja, at húsaprísirnir hækka dag um dag. Tað kostar nú so nógv at keypa sær hús ella íbúð í miðstaðarøkinum, at tað nærum er vónleyst hjá ungum familjum, skulu tær ikki at binda seg fíggjarliga til langt inn í ellisár. Oljuprísirnir eru methøgir, og tí er tungt at húsast hjá nógvum familjum og hjá eldri fólki.

Hetta vilja vit - og hetta fara vit - at gera nakað við!

Familjan fer at standa fremst í raðfestingunum á komandi fíggjarlóg. Bústaðarpakkin, sum Landsstýrið fer at leggja fram, fer at gera tað lættari hjá ungum fólki og familjum at seta búgv og fer eisini at betra um møguleikarnar hjá fólki við serligum tørvi at fáa sær egnan bústað.

Hetta fara vit at gera við tveimum lógaruppskotum - einum um lutaíbúðafeløg og einum um bústaðapartafelag. Skipanin við lutaíbúðafeløgum ger tað lættari hjá fólki við lægri inntøkum at seta føtur undir egið borð. Somuleiðis fara eldri fólk at kunna skifta hús síni um við minni bústaðir. Við hesum gerst bústaðarmynstrið fjølbroyttari.

Lógin um bústaðapartafelag fer at skipa Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin í eitt alment partafelag, sum skal fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi.

Landsstýrið fer at gera tað møguligt hjá lesandi at fara í barnsburðarfarloyvi, so at korini hjá teimum gerast betri.

Vit fara at leggja barnafrádráttin um til eitt útgjald. Hetta merkir, at eisini tey, sum onga arbeiðsinntøku hava, fáa barnastuðul. Umframt hetta ætlar Landsstýrið at hækka stuðulin til barnafamiljur við serligum tørvi.

Landsstýrið fer at leggja fram uppskot um sjúkradagpeningalóg, sum fer at gera, at tímalønt fáa betri møguleikar at vera heima hjá sjúkum børnum, og eitt uppskot um felags foreldramyndugleika fyri at styrkja støðuna hjá bæði børnum og foreldrum.

Vit hava longu økt inngjaldið í Samhaldsfasta, og samsvarandi er útgjaldið nú hækkað. Frá 1. januar næsta ár fer tað veruliga at merkjast, tí tá hækkar útgjaldið munandi. Saman við reguleringini av fólkapensjónini fer ein fólkapensjonistur, sum ikki hevur aðra munandi inntøku, at fáa 9.000 kr., og eini hjún 15.000 kr. um mánaðin.

Harumframt fer Landsstýrið at fremja ein víðfevnandi eftirlønarreform, sum fer at bera við sær, at allir borgarar sum frá líður fara at gjalda til egna eftirlønarskipan. Hetta er ein neyðugur lutur fyri at tryggja komandi ættarliðum góð pensjóns- og eftirlønarviðurskifti. Eitt álit um pensjónsreformin kemur nú í heyst.

## Visjón 2015

Í fjør nýtti eg stóran part av ólavsøkurøðuni til at umrøða hugsanirnar aftan fyri Visjón 2015, sum er eitt av hjartamálunum hjá Landsstýrinum. Sum kunnugt hevur Landsstýrið sett strategibólkar at gera uppskot til mál og ítøkiligar ætlanir fyri samfelag okkara. Somuleiðis setti Landsstýrið eitt visjónstorg, sum er breitt umboðað av politisku skipanini, umframt av arbeiðstakarum, arbeiðsgevarum og áhugafeløgum. Visjónstorgið viðger og umrøður tað arbeiði, sum strategibólkarnir leggja fram.

Arbeiðið higartil hevur gingið væl, og fólkið hevur tikið visjónina til sín. Almenningurin viðger visjónina í álvarsemi, konstruktivt og jaliga, og við hvørt meira kritiskt og neiliga. Tað er umráðandi at vit kjakast, og at vit líta longur fram - at hugarenslið verður strekt munandi longri enn til næsta val. Tí kjakið er grundarlagið undir teimum avgerðum, vit skulu taka, fyri at fáa samfelagið, vit ynskja okkum í 2015.

Eg skal her leggja dent á, at bólkarnir koma við teimum uppskotum, sum teir meta vera rættast – óheft av samgonguskjalinum ella politiska viljanum annars. Landsstýrið fer gjølla at viðgera uppskotini, ið koma frá strategibólkunum.

Í juni varð skipað fyri fýra visjónsdøgum, har teir ymsu strategibólkarnir løgdu fram tey mál, sum teir meta, at vit eiga at seta okkum. Í løtuni arbeiða bólkarnir við at leggja strategiir fyri hesi mál, og í heyst fara teir at leggja endaliga arbeiði sítt fyri Visjónstorgið.

Landsstýrið vil nýta hetta arbeiðið til at finna felags semjur og felags kós á økjum, har tað er avgerandi neyðugt at leggja langtíðarætlanir – eitt nú um vinnukarmar, gransking og skúlaverk.

## Fólkaskúlin

Eg nevndi fyrst í røðuni, at vit fara at leggja dent á familjuna á komandi fíggjarlóg. Skúlaverkið, sum er grundarsteinur í Visjón 2015, fær eisini fremstu raðfesting. PISA-undankanningin, sum varð almannakunngjørd í vár, bendi á, at føroyskir næmingar eru ikki nóg væl fyri fakliga.

Landsstýrið hevur tikið hesa niðurstøðu í allar størsta álvara og hevur viðgjørt kanningina saman við øllum skúlaleiðarum í fólkaskúlanum.

Bøtast skal um umstøðurnar hjá øllum næmingum, bæði teimum, sum duga væl, og ikki minni hjá teimum, sum tørvar hjálp.

Størri áherðsla skal leggjast á byrjanarundirvísingina, serliga í føroyskum og støddfrøði. Málið er, at næmingarnir duga at lesa eftir annað skúlaár. Umráðandi er at menna bæði lesiførleikan og lesiáhugan hjá næmingunum og at skipa so fyri, at teir fáa fjølbroytt og mennandi tilfar á móðurmálinum.

Umframt fráfaringarroyndirnar er ætlanin at seta í verk støðuroyndir, til dømis í 3., 5. og 7. flokki, sum ein lið at eftirmeta undirvísingina í skúlunum.

Næsta PISA-kanningin verður á vári 2009, og tá skulu Føroyar vera líka væl fyri sum hini Norðurlondini.

Arbeitt verður við at gera skúlan betri til at taka ímóti næmingum við serligum tørvi og at styrkja sernámsfrøðiligu tænastuna, eitt nú við tænastueindum kring landið. Tann fyrsta eindin er sett á stovn í Eysturoynni. Næstu eindirnar skulu eftir ætlan vera í Suðuroy og Streymoynni.

Fakligi førleikin hjá lærarum hevur sjálvandi størstan týdning fyri fólkaskúlan, og sum ein avgerandi liður í menningini skulu lærara- og pedagogútbúgvingarnar styrkjast munandi. Næsta vár verður lógaruppskot um at nútímansgera læraraútbúgvingina lagt fyri tingið. Ætlanin er at skipa lærara- og pedagogútbúgvingarnar á bachelorstigi. Hesar útbúgvingar skulu í framtíðini í allar mátar vera eins góðar og tilsvarandi útbúgvingar í ES og grannalondum okkara. Hetta er neyðugt, skulu lærarar og pedagogar taka ímóti støðugt vaksandi avbjóðingum.

## Fiskivinnan

Seinasta tíðin hevur verið merkt av nógva kjakinum um keyp og sølu av fiskiloyvum. Hetta er ikki nýtt fyribrigdi, men hevur verið ein veruleiki í rættiliga nógv ár, tó uttan at nøkur haldbar politisk loysn er funnin.

Landsstýrið tekur spurningin í fullum álvara og hevur sett hol á eina politiska viðgerð, sum fer at hava við sær eina heilt nýggja lóg um vinnuligan fiskiskap.

Millum annað skal henda politiska viðgerðin taka støðu til spurningar sum at staðfesta ognarrættin, og undir hesum uppsøgn av veiðiloyvum, brúksskyldu, tilfeingisgjald og møguleikar hjá tí almenna at selja fiskirættindi.

Landsstýrið fer at arbeiða fyri atlimaskapi í FAO, sum er matvøru- og landbúnaðarfelagsskapurin hjá ST. Hetta er ein góður samskiftisdepil hjá heimsins fiskivinnulondum. Atlimaskapur fer at geva okkum ein virknari og sjónligari leiklut sum fiskivinnutjóð í alheimshøpi, og vit fáa eisini høvi at gera vart við okkum á røttum stað.

Størsta framstigið í samráðingunum um fiskiveiðuavtalur fyri 2006 var semjan, sum loksins varð gjørd við Ísland, Noreg og ES um, hvussu svartkjaftastovnurin skal umsitast. Okkara samráðingarfólk áttu stóran lut í hesi semju, sum undir givnum fortreytum var sera góð.

Støðug menning í fiskivinnuni skal styrkja um kappingarføri okkara. Tí er ætlanin framhaldandi at tillaga játtanirnar til gransking á fiskivinnuøkinum, so at støðug menning av vinnugranskingini verður raðfest fremri.

## Onnur vinna

Tað tykist, sum føroyska vinnan sum heild gerst dynamiskari og fjølbroyttari, og vónandi fær brúkarin ágóða av hesum. Vit síggja, at kapping er á fleiri økjum – eitt nú innan telefoni, internet, flogferðslu og peningastovnar. Og fleiri fyritøkur víðka sítt virksemi uttan fyri landoddarnar.

Á tryggingarøkinum fara munandi broytingar at henda. Útlendsk tryggingarfeløg fara at fáa atgongd til føroyska marknaðin, og brúkarin fer at kunna tekna tryggingar uttanlands.

At fleiri almennar fyritøkur nú verða einskildar, fer at skapa enn meira dynamikk. Ætlanin er at selja 33% av partabrøvunum í Atlantsflogi í ár, og helvtin av partabrøvunum í Føroya lívstrygging verður latin tryggingartakarunum. Hin helvtin verður seld øðrum íleggjara. Byrjað verður eisini at einskilja Føroya banka og Føroya tele í 2007.

Í hesi løtu verður fjórði brunnurin á landgrunninum boraður. Ein boring verður í 2007 og ein í 2008. Hugsa vit um tær ovurhonds stóru upphæddir, sum oljufeløgini nýta til borivirksemi í og nærhendis føroyskum øki, so er lítil ivi um, at tey trúgva uppá, at olja er at finna. Og tað, at nógv olja er funnin bretskumegin markið, ger hetta ógvuliga sannlíkt. Hóast ein møgulig oljuvinna helst liggur nøkur ár frammi í tíðini, mugu vit longu nú fyrireika okkum bæði mentalt og samfelagsliga til tær grundleggjandi broytingar, ein slík vinna fer at hava á okkara samfelag.

Landsstýrið fer at seta á stovn ein búskapargrunn, har serligar inntøkur til landskassan, eitt nú inntøkur frá einskiljingum og eini møguligari oljuvinnuni, fara í. Grunnurin skal millum annað nýtast til at standa ímóti við í verri tíðum, til at gjalda niður almenna skuld og til at fíggja gransking.

Gransking er eisini eitt øki, vit í sambandi við Visjón 2015 leggja stóran dent á at styrkja í framtíðini, og Vísindaráð Føroya verður sett í næstum. Vit hava nú fingið eitt ílegusavn, sum verður liður í at byggja upp eina ílegugransking í Føroyum.

Í alivinnuni eru stór framstig við at henda, hóast útflutningurin í ár er sera lítil. Bøttar mannagongdir í alingini havaført til betri sjúkufyribyrging og hava saman við koppseting bast ILA-sjúkuni. Alivinnan tykist at fara at fóta sær í størri og sterkari eindum, sum helst verða kappingarførari við útlendskar alifyritøkur.

Ætlanin er somuleiðis at gera Føroya altjóða skipaskráseting kappingarføra. 9 skip komu í FAS í fjør, og við árslok vóru til samans 35 skip í skrásetingini.

Á ymiskan hátt fer Landsstýrið at stuðla upp undir íverksetan og at menna íverksetaramentan. Samstundis skal land okkara marknaðarførast sum eitt land, har tað er gott at gera íløgur – eitt nú í almennar fyritøkur, sum verða einskildar. Sum eitt land, har útlendskar fyritøkur kunnu royna nýggjar KT-skipanir. Sum eitt áhugavert land í sambandi við frálandavinnu, aling, fiskavirking og gransking.

## Arbeiðsmarknaður

Á arbeiðsmarknaðinum eru verulig frambrot gjørd, við tað at partarnir hava stovnað fastan gerðarrætt og gjørt sáttmála um, hvussu trætumál og spurningar um sáttmálabrot skulu greiðast sum skjótast og við fyriliti fyri samfelagsligum áhugamálum. Partarnir eiga miklan heiður uppiibornan fyri hetta avrik sítt.

Ein arbeiðsmarknaður, har rúmd er fyri øllum, eigur at vera næsta frambrotið.

Í einum vælferðarsamfelagi sum okkara eigur tað at vera ein sjálvfylgja, at fólk við skerdum førleika kunnu skapa sær eitt lív við innihaldsríkum arbeiði og fastari inntøku. Men tíverri mugu vit ásanna, at tað framvegis er alt ov lítið rúm fyri teimum ófullføru á arbeiðsmarknaðinum – bæði tí privata og tí almenna.

Tí verður farið undir eina serliga verkætlan. Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni skal styrkjast, so at vit kunnu fáa fleiri fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðin og fyribyrgja, at fólk missa tilknýtið til hansara.

Eg fari inniliga at heita á privatar so væl sum almennar arbeiðsgevarar um at hugsa um tað samfelagsliga virðið, sum liggur í einum rúmligum arbeiðsmarknaði.

## Útlendingamál

Útlendingaøkið hevur fingið nógva umrøðu. Eingin ivi skal vera um, at Landsstýrið vil, at vit taka væl ímóti teimum útlendingum, sum koma higar at arbeiða og seta búgv. At taka ímóti útlendingum krevur eisini av okkum, at vit fáa hesar borgarar at fella til í okkara samfelagi.

Umsóknirnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi gerast alt fleiri. Fyrra hálvár í ár komu umleið 270 umsóknir aftur ímóti umleið 90 somu tíð í fjør. Harumframt eru aðrar umsóknir um uppihaldsloyvi, eitt nú familjusamanføringar.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa skil á útlendingaøkið. Okkara reglur skulu vera smidligar og samfelagsliga skilagóðar. Skjótari og greiðari mannagongdir fyri málsviðgerðina av útlendingamálum verða nú gjørdar.

Landsstýrið vil stovna eitt arbeiðsmarknaðarráð við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at ráðgeva Innlendismálaráðnum um tørvin á útlendskari arbeiðsmegi.

Vit vilja leggja okkum eftir at fáa breiða politiska semju á tingi um okkara framtíðar útlendingapolitikk.

## Støðan í tølum

Hyggja vit eitt sindur at hagtølum, so búðu 48.258 fólk í Føroyum tann 1. apríl – 189 færri enn somu tíð í fjør.

Fólkatalið vaks nógv frá 1997 til 2002, men í fjør var afturgongd. Tá fluttu 422 fólk fleiri av landinum enn til landið. Fólkatalið minkaði tó ikki meira enn 127 fólk, tí burðaravlopið er stórt.

Tað verða fødd nakað oman fyri 700 børn um árið, ella 2,62 børn í miðal fyri hvørja kvinnu í barnførum aldri. Hetta er tað mesta síðan 1990 og tað mesta í øllum Evropa. Hetta er eitt heilsutekin, og vit skulu gera okkara til, at familjurnar trívast, so at vit varðveita høga barnatalið. Tað er ein góð trygd fyri okkara samfelag í framtíðini.

Tekin eru nú um, at nettofráflytingin seinastu árini er um at venda til eina nettotilflyting, og vit mugu vóna, at so verður. Okkum tørvar allar góðar kreftir, og tað hevur sjálvsagt stóran týdning fyri landið, at fólk, sum fara í onnur lond at úbúgva seg ella nema sær royndir, flyta heim aftur.

Brúkaraprísirnir eru nakað hækkaðir, men samanumtikið hevur inflasjónin verið tann sama sum í hinum Norðurlondunum, ið ikki hava stóra inflasjón.

Verða skipini ikki uppítald, er okkara innflutningur minkaður javnt og samt frá 2001 til 2005. Seinastu mánaðirnar er hann tó vaksin aftur. Síðsta árið eru prísirnir á oljuúrdráttum nógv uppfarnir, og hetta sæst týðiliga aftur í innflutningstølunum.

Framvegis er nógv tann størsti parturin av okkara útflutningi fiskur og fiskavørur - um 95%. Fyrsta ársfjórðing í ár var útflutningsvirðið 934 mió. kr. Hetta eru 9% meira enn somu tíð í fjør. Høvuðsorsøkin til vøksturin eru munandi betri fiskaprísir, tí samstundis, sum virðið er vaksið, er útflutta nøgdin minkað. Útflutningsvirðið á alifiski er tó minkað nógv, men væntandi fer tað nú at vaksa aftur.

Sum nakað nýtt eru vit farin at skráseta aðrar vørur enn fisk og fiskaúrdráttir í hagtølunum fyri útflutning. Eftir at lógin um skráseting kom í gildi, er talið á skrásettum vørum farið úr 150 upp í 240, og mett verður, at einar 100 mió. kr. av føroyska útflutninginum vóru óskrásettar, áðrenn nýggja lógin kom í gildi.

Hallið á handilsjavnanum var lutfalsliga stórt í fjør – 675 milliónir krónir. Tá eru skip íroknað.

Føroyska bruttoskuldin uttanlands var 6 mia. kr. í 2004, og bruttoognin var 9,4 mia. kr. Hetta svarar til, at nettoognin uttanlands var um 3,4 mia. kr. Hon er tískil minkað 1 mia. kr. frá 2002 til 2004.

Nettoskuld landskassans er 3 mia. kr.

## Samferðslukervið

Nýggi Smyril kom til landið seinast í 2005, og í apríl varð Norðoyatunnilin upplatin. Við honum hava um 85% av fólkinum nú landfast samband. Av størri samferðsluætlanum kunnu nevnast útbygging av flogvøllinum, sum farið verður undir, nú hann verður yvirtikin. Vit eru sera fegin um, at ein loysn loksins er komin fyri flogvøllin, sum so harðliga treingir til at dagførast og útbyggjast.

Arbeitt verður við verkætlan um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Havnina, og forkanningarnar eru farnar í gongd til tunnil millum Streymoynna og Sandoynna.

Vit fegnast um, at okkara undirstøðukervi áhaldandi verður útbygt. Men vit mugu tíverri eisini ásanna, at ferðslan hevur sína skuggasíðu, og framvegis doyggja ov mong í ferðsluni. Tí verður í hesi tingsetu lagt fram uppskot at broyta ferðslulógina, har serliga verður hugsað um ungar bilførarar.

## Heilsa

Landsstýrið leggur dent á, at heilsustøða føroyinga skal vera góð, og nú verður stóra fólkaheilsuætlanin sett í verk.

Hetta skal geva føroyingum – ungum sum gomlum - betri heilsu og harvið betri lív. Fólkaheilsuætlanin skal fyribyrgja fólkasjúkum sum krabbameini, hjarta- og æðrasjúkum og sukursjúku. Í fólkaheilsuætlanini verður høvuðsdentur lagdur á at fáa fólk at røra seg meira, roykja minni, eta heilsubetri mat og at minka um rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsluna.

Nógvir skúlar hava gjørt íløgur í vatnkølarar og geva børnunum dagligt tilboð um frukt. At okkara skúlabørn kunnu velja frukt og reint vatn fram um góðgæti og sodavatn fær stóra ávirkan á fólkaheilsuna í framtíðini. Eisini fegnast vit um stóru undirtøkuna fyri fólkaheilsurenningini, sum verður hildin á triðja sinni í heyst.

Annar liður í okkara heilsupolitikki er at høvuðsumvæla og nútímansgera Landssjúkrahúsið, so at tað kann gerast eins gott og sjúkrahúsini í grannalondum okkara, tá ið ræður um kanningartilboð, viðgerðartilboð, trygd og hentleikar. Arbeitt verður av øllum alvi at talgilda heilsuverkið, so at sjúklingar kunnu fáa betri tænastur.

Hóast psykiatriin hevur verið fyri munandi framstigum seinastu árini, ásanna vit í Landsstýrinum, at enn er langt á mál. Gerast skal nýggj psykiatrilóg, sum tryggjar rættindini hjá sálarsjúkum. Útbyggingin av sosialpsykiatriini og økispsykiatriini skal halda fram, og barna-, ungdóms- og eldrapsykiatriskar tænastur skulu setast á stovn komandi árini.

Harra formaður.

Hetta landsstýrið setti sær fyri at fáa greið og støðug viðurskifti við Danmark til tess at fáa útint tey mongu politisku mál, sum vit settu okkum. Sambandið og samstarvið okkara millum er í dag merkt av virðing frá báðum pørtum, sum er grundleggjandi neyðugt, um ein skal fremja tey mál, ein setur sær. Tað merkir tó ikki, at Landsstýrið er samt við donsku stjórnina í einum og øllum!

Men tað hevur eydnast Landsstýrinum at gera fleiri týdningarmiklar semjur við danir, sum føra land okkara longri fram á leiðini móti fullari ábyrgd av øllum okkara viðurskiftum – innanríkispolitiskt sum uttanríkispolitiskt. Dømi um hetta eru uttanríkispolitiska lógin og yvirtøkulógin, sum nú hava verið í gildi í eitt ár. Nú vit hava fingið yvirtøkulógina, eru tað einans vit sjálv, sum gera av, nær vit yvirtaka málsøki.

Størsta yvirtøkan í hesum valskeiðnum verður fólkakirkjan, og Landsstýrið ætlar, at kirkja okkara skal vera føroysk næstu ólavsøku.

Fjølmiðlaábyrgdin er yvirtikin, og fjølmiðlakærunevnd er sett.

Aftur at hesum er ætlanin at yvirtaka vinnufelagslóggávu og tilbúgving. Felags stovnur fyri tilbúgvingarmyndugleikan er skipaður.

## Stjórnarskipan

Arbeiðið í stjórnarskipanarnevndini gongur eftir ætlan, og nevndin fer at handa mær álit seinast í árinum. Síðan skal málið viðgerast politiskt. Millum týdningarmiklu tættirnar er spurningurin um, hvussu mannagongdin skal vera, um verandi ríkisrættarliga støðan skal sigast upp.

## Norðurlendska samstarvið

Umsóknin um føroyskan limaskap í norðurlendska samstarvinum verður framvegis viðgjørd, og mál okkara er fullur limaskapur. Hinvegin er at leggja sær í geyma, at politiskar forðingar eru fyri broytingum í norðurlendskum høpi, og at Danmark framvegis hevur eitt ávíst stjórnarrættarligt fyrivarni fyri fullum limaskapi. Hetta, hóast uttanríkispolitiska lógin leggur upp fyri hesum.

## Uttanríkispolitikkur og menningarhjálp

Harra formaður.

Eg legði fyri við at siga, at tað stendur væl til í landi okkara, og búskaparútlitini eru góð. Og í dag fegnast vit um okkara tjóðarhátíð, og at vit liva í einum landi við fólkaræði, har friður valdar. Vit hava í royndum allar fyritreytir at skapa eitt enn betri og sterkari samfelag. Hetta er als eingin sjálvfylgja, tí at heimurin kring okkum er alt annað enn tryggur. Í hesi løtu bresta bumbur í Libanon og Ísrael, og vandi er fyri, at Miðeystur alt fer at standa í ljósum loga, um ikki vápnahvíld verður sum skjótast. Bumbur greiða ongar trætur, men sáa einans mistreysti og hatur. Íbúgvarnir gjalda ein prís, vit illa duga at ímynda okkum.

Á heimskortinum er tíverri stutt millum økini, har kríggj og náttúruvanlukkur gera um seg. Tað er ein sjálvfylgja, at rík lond sum okkara eru við til at byggja upp aftur. Farnu tingsetu hava vit latið nakað av peningi til bráðfeingis neyðhjálp, og vit eru farin at byggja menningarhjálp upp sum øki í fyrisitingini. Framvegis eru tað ikki stórar upphæddir, ið avsettar verða, men tær tríggjar milliónirnar á fíggjarlógini eru ein byrjan.

Landsstýrið ætlar, at menningarhjálp skal gerast fastur partur av okkara uttanríkispolitikki og ætlar at menna økið so líðandi. Í dag samstarva Føroyar við Heimsbankan, CARE Peru, Mercy Corps og íslendska menningarhjálparstovnin Iceida. Í hesum sambandi kann eg nevna, at tann fyrsti føroyski starvslesandi er farin til Namibia og Malavi.

## Uttanríkispolitikkur sum heild

Føroyar eru av álvara farnar at virka uttanríkispolitiskt, og vit seta okkum framsøkin mál. Ein avgerandi liður er at gera land okkara sjónligari, og her hevur tað stóran týdning, at løgmaður og landsstýrismenn áhaldandi virka fyri føroyskum vinnu- og mentanaráhugamálum í øðrum londum.

Løgmaður var í vár saman við føroyskum vinnulívsfólki í India, har virkað varð fyri vinnuligum netverkum, eins og tosað varð við politiskar myndugleikar og umboð fyri stovnar og felagsskapir. Indiski áhugin fyri føroyskari tøkni og vitan – eitt nú innan fiskivinnuna - var stórur. Somuleiðis kann okkara vinna læra mangt frá londum sum India, londum, ið mennast skjótt og eru í fremstu røð á fleiri økjum – eitt nú í kunningar- og samskiftistøkni.

Tá ið íslendski forsætisráðharrin var í Føroyum við íslendskum vinnulívsfólki í vár, beyð hann løgmanni á almenna vitjan í Íslandi. Eg havi tikið av hesi innbjóðing og ætli at bjóða vinnulívsfólki við á ferðina.

Landsstýrið leggur stóra áherðslu á at økja um møguleikarnar hjá vinnu okkara at virka úti í heimi. Og nógv er hent hesa tingsetu, nú altjóða handilspolitiski karmurin fyri vinnuna er batnaður munandi.

Føroyar eru vorðnar partur av Pan-euro-med skipanini um at samsavna uppruna, atgongdin fyri okkara fiskavørur til ES-marknaðir er vorðin betri, og Russlandssáttmálin fær nú gildi.

Hesin sáttmáli javnsetur føroyskar fyritøkur við fyritøkur í Íslandi, Noregi og ES, ið hava bestu handilsligu viðurskifti við Russland. Sáttmálin fer serliga at koma uppsjóvarvinnuni til góðar.

Uttanríkispolitiska lógin hevur nú virkað í eitt ár, og við henni eru fleiri millumtjóðasáttmálar gjørdir - sáttmálar við Ísland, Noreg, ES og Sveis, um at Føroyar eru við í felags evropisku skipanini um samsavnan av uppruna – Pan-euro-med.

Tá ið Hoyvíkssáttmálin kemur í gildi seinni í ár, verða Føroyar og Ísland eitt búskaparøki. Eingin ivi er um, at sáttmálin fer at roynast væl hjá vinnu okkara, og at hann fer at stimbra búskapin.

Landsstýrið hevur fingið fráboðanir frá dønum um, at Loran-C støðin á Eiði ikki fer at verða rikin sum higartil. Landsstýrið hevur fingið at vita, at radarin á Sornfelli verður sløktur við árslok. Hetta eru tvey mál, sum Landsstýrið arbeiðir miðvíst við at greiða í samráði við uttanlandsnevndina.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni miðvíst við at fáa í lag EFTA-limaskap. Í hesum sambandi havi eg verið á fundi við Liktinstein og Sveis. Eftir summarfrítíðina verður fundur við ávikavist Ísland og Noreg.

Umframt EFTA-limaskap ætla vit at styrkja okkara samband við ES og arbeiða fyri, at samstarvið í framtíðini skal fevna um tey fýra frælsini fyri vørur, tænastur, kapital og persónar umframt samstarv á øðrum økjum, ið hava felags áhuga so sum útbúgving, gransking og mentan.

Í heyst verður uttanríkispolitisk frágreiðing løgd fyri Løgtingið.

Sum løglistin boðar frá, so verður nógv politiskt virksemi í komandi tingsetu. Vit fara at avgreiða ein familju- og bústaðarpakka og hava eina grundleggjandi viðgerð av okkara høvuðsvinnu. Vit fara undir setningin at styrkja okkara fólkaskúla, so tað ger mun. Vit skulu samtykkja ein eftirlønarreform og yvirtaka fólkakirkjuna. Og ætlanirnar fyri grundarsteinarnar í Visjón 2015 verða lagdar fram og viðgjørdar.

Harra formaður.

Samanumtikið stendur væl til í Føroyum. Lat okkum tí taka saman hendur, so at vit ikki bert halda fast við framgongdina, men lyfta samfelagið longri fram á leið.

Góða tingsetu og góða ólavsøku!

# PARTUR II

## Stjórnar- og uttanríkismál

### Visjón 2015

Á ólavsøku í fjør fór stórur partur av frágreiðing løgmans at greiða frá teimum hugsanum, sum liggja aftan fyri Visjón 2015. Tá vórðu eisini umrøddir nakrir av grundarsteinunum í visjónini.

At fáa til vegar ítøkiligar ætlanir fyri umráðandi partar av samfelagsskipanini, setti Landsstýrið nakrar strategibólkar at gera uppskot um mál og strategiir. Somuleiðis varð sett eitt visjónstorg, sum er breitt umboðað av politisku skipanini, umframt av arbeiðstakarum, arbeiðsgevarum og áhugafeløgum. Visjónstorgið skal viðgera og umrøða tað arbeiðið, sum strategibólkarnir leggja fram.

Arbeitt hevur verið miðvíst í strategibólkum og visjónstorgi, og í juni varð skipað fyri visjónsdøgum, har bólkarnir løgdu fram tey mál, sum vit eiga at seta okkum, um Føroyar skulu verða millum fremstu tjóðir í 2015. Arbeiðið er enn ávegis, og strategibólkarnir stinga nú út í kortið, hvussu vit kunnu røkka fyrisettu málunum. Í heyst fara teir at leggja endaliga arbeiði sítt fyri Visjónstorgið.

### Útflutningsframi

Nú Føroyar verða virknari í alheimssamfelagnum og sett verða framsøkin uttanríkispolitisk mál, eiga løgmaður og landsstýrismenn eftir besta førimuni at virka fyri føroyskum vinnu- og mentanaráhugamálum í øðrum londum.

Í vár var løgmaður saman við føroyskum vinnulívsfólki í India, har virkað varð fyri vinnuligum netverkum og tosað varð við politiskar myndugleikar og umboð fyri stovnar og felagsskapir. Ferðin eydnaðist sera væl, og løgmaður hevur fingið áheitan frá vinnuni um at gera fleiri tílíkar ferðir.

Tá ið forsætisráðharri Íslands var í Føroyum við íslendskum vinnulívsfólki í vár, beyð hann løgmanni á almenna vitjan í Íslandi. Løgmaður fer at taka av hesi innbjóðing og ætlar at bjóða føroyskum vinnulívsfólki við á ferðina. Nú Íslandssáttmálin skjótt kemur í gildi, er umráðandi, at føroyskar vinnufyritøkur gera sær dælt av teimum møguleikum, ið sáttmálin letur upp fyri.

### Sjálvstýrismál

Yvirtøkulógin og uttanríkispolitiska lógin hava nú verið í gildi í eitt ár.

Við heimild í yvirtøkulógini hava føroyskir myndugleikar nú einsamallir gjørt av at yvirtaka málsøkið fjølmiðlaábyrgd. Hesa avgerð bar ikki til at taka, áðrenn yvirtøkulógin kom. Í hesi tingsetu ætlar landsstýrið at yvirtaka tey málsøki, ið eftir eru í samgonguskjalinum, t.e. fólkakirkju, vinnufelagslóggávu og tilbúgving. Allar yvirtøkur verða nú gjørdar við serligari løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, har øll málsøki, ið enn ikki eru yvirtikin, eru allýst. Tá ið yvirtøkur verða framdar, verður tað sostatt gjørt við eini broyting í nevndu ræðislóg. Við hesum hátti verður altíð full greiða á, hvørji mál og málsøki eru á føroyskum

hondum, og hvørji eru á donskum. Harafturat fæst betri greiða á ivaspurningum í sambandi við yvirtøkur.

Endalig avtala er nú gjørd millum løgmann og danska forsætisráðharran um at yvirtaka flogvøllin og at fíggja eina nútímansgerðing við at niðurkapitalisera íleggingargrunnin við fólkatingslóg. Hetta má sigast at vera í tøkum tíma, tí málið hevur verið óloyst í næstan átta ár, júst í eini tíð, har tørvurin á at nútímansgera flogvøllin hevur verið støðugt vaksandi.

Samsvarandi uttanríkispolitisku lógini eru fleiri millumtjóðasáttmálar longu gjørdir. Teirra millum eru sáttmálar við Ísland, Noreg, ES og Sveis, um at Føroyar vera við í felags evropiska upprunaøkinum, ið eisini fevnir um londini kring Miðjarðarhavið. Fáa vit limaskap í EFTA, verður tað eisini í samsvari við hesa lóg. Higartil hevur lógin sostatt víst seg at vera ein hóskandi karmur um uttanríkisarbeiðið Føroya.

## Stjórnarskipan

Arbeiðið í stjórnarskipanarnevndini gongur eftir ætlan, og nevndin fer at handa løgmanni álit innan 31. desember í ár. Síðan verður málið lagt til politiska viðgerð. Millum týdningarmiklu tættirnar er spurningurin um, hvussu mannagongdin skal vera, um verandi ríkisrættarliga støðan skal sigast upp.

## Samstarvið í Norðurlandaráðharraráðnum

Umsóknin um føroyskan limaskap í norðurlendska samstarvinum verður framvegis viðgjørd, og ætlanin er enn sum áður at fáa fullan limaskap. Málið liggur í løtuni hjá samstarvsráðharrunum. Frágreiðingin hjá norðurlendskum serfrøðingum um støðuna hjá sjálvstýrandi londunum í norðurlendskum samstarvi, sum samstarvsráðharrarnir hava biðið um, er komin og er send uttanlandsnevndini.

Frágreiðingin varð umrødd á MR-SAM fundi tann 14. juni í Ålesund. Har varð avgjørt, at londini skuldu fáa góðar stundir at viðgera hana fyri síðan at venda aftur til málið á næsta MR-SAM fundi. Á fundi tann 28. juni í ár í Tinganesi millum formansskapin í Norðurlandaráðnum og umboð fyri Landsstýrið varð frágreiðingin umrødd. Fyribils niðurstøðan var, at tað neyvan eru nakrar fólkarættarligar forðingar fyri føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum.

Frágreiðingin er annars til ummælis hjá føroyskum løgfrøðingi, og tá ið úrslitið er tøkt, verður farið at viðgera hana politiskt. Landsstýrið fer sjálvsagt at ráðføra seg við uttanlandsnevndina um málið og fer undir viðgerðini eisini at hava samband við Áland og Grønland at tryggja, at partarnir vita av hvør øðrum. Á fundi tann 7. september í ár fara samstarvsráðharrarnir væntandi at taka støðu til frágreiðingina og hvussu farast skal fram i málinum.

## Altjóða handilspolitisk mál

Altjóða handilspolitiski karmurin fyri føroysku vinnuna er batnaður munandi seinasta árið. Føroyar eru vorðnar partur í EuroMed-skipanini um samsavnaðan uppruna, og 1. august 2006 verður settur í gildi MFN-sáttmáli millum Føroyar og Rusland. MFN stendur fyri Most Favoured Nation, og við hesum sáttmála fáa føroyskar útflutningsfyritøkur somu kappingarumstøður í Russlandi sum fyritøkur í teimum londum, ið hava bestu handilsligu viðurskifti við Russland, eitt nú fyritøkur í Íslandi, Noregi og ES. Hetta fer serliga at koma uppsjóvarvinnuni til góðar, tí tollurin fer at lækka munandi.

Fundur var í felagsnevndini Føroyar-ES í summar, og fleiri týðandi semjur vórðu gjørdar. Kvotan á pilkaðum rækjum varð tvífaldað, so at hon verður 6.000 tons eftir trimum árum, og útflutningurin av frystari, rundari hýsu varð frælsisgjørdur. Harumframt er nú væntandi, at avgerð verður tikin við skrivligari mannagongd longu seinni í ár um at kvotan á fiskafóðri verður tvífaldað uppí 20.000 tons, tó at málið er 50.000 tons.

Ásannandi at politiskur meiriluti er ikki fyri føroyskum ES-limaskapi orsakað av fiskivinnupolitikki ES og støðu Føroya sum partur av danska ríkinum, ætlar landsstýrið at fáa í lag munandi tættari formligt samstarv millum Føroyar og ES. Hetta samstarv fevnir um tey fýra frælsini fyri vørur, tænastur, kapital og persónar, umframt onnur økið, ið hava felags áhuga, til dømis útbúgving, gransking og mentan. Hetta mál varð eisini viðgjørt á seinasta fundi í felagsnevndini millum Føroyar og ES. Partarnir vóru samdir um at hittast á fundi aftur næsta ár í Brússel og annars at halda fram við teimum óformligu fundunum, ið liggja millum árligu felagsnevndarfundirnar.

Tilgongdin ímóti føroyskum EFTA-limaskapi er byrjað. Í hesum sambandi hevur føroysk sendinevnd á embætismannastigi verið á rundferð til EFTA-høvuðsstaðirnar at greina málið betur. Tilgongdin heldur nú fram á politiskum stigi. Løgmaður hevur longu havt fundir við Liktinstein og Sveis, og beint eftir summarfrítíðina fer løgmaður á fund við Ísland og Noreg. Eingin ivi er um, at gongdin fram ímóti EFTA-limaskapi fer at taka tíð og krevja fleiri átøk á ymsum stigum næstu mánaðirnar.

Hoyvíkssáttmálin varð fyrr í ár góðkendur í Føroyum og Íslandi. Áðrenn sáttmálin fær gildi, skal Danmark eisini hava góðkent hann. Ilt er í hesi løtu at siga, nær henda góðkenningarmannagongd er lokin. Hesin sáttmáli fer at skipa Føroyar og Ísland í eitt og sama búskaparøki, og longu nú eru fleiri góðtekin komin ymsastaðni frá um sáttmálan. Eingin ivi er um, at hann fer at gagna Føroyum á fleiri økjum, ikki minst búskaparliga.

## Altjóða tilfeingismál

Svartkjaftasemjan við Ísland, Noreg og ES var størsta frambrotið viðvíkjandi altjóða tilfeingi í seinastu tingsetu. Svartkjaftatilfeingið á havleiðum okkara er og verður týðandi táttur í føroyska búskapinum. Sama kann sigast um makrel og norðhavssild, sum nú aftur stendur í føroyskum sjógvi. Strandarlandaavtala varð aftur gjørd um makrel, men fyri norðhavssildina hevur eingin strandarlandasemja verið seinastu árini. Annars vóru árligu semjurnar um sínámillum veiðirættindi við londini kring norðurhøv longdar nøkulunda óbroyttar.

Í løtuni verður kannað, um Føroyar kunnu verða sjálvstøðugur avtalupartur í millumtjóða felagsskapunum NAFO og NEAFC. Um so er, verða vit helst sjálvstøðugur limur í egnum navni.

## Altjóða menningarsamstarv

Økið er framvegis nýtt, og tí ræður um at ogna sær royndir og at leggja arbeiðið til rættis á besta hátt. Seinasta árið er nógv orka løgd í at kanna, hvussu onnur lond skipa samstarv sítt við menningarlond. Tað var við hesi barlast, at lógaruppskotið um altjóða menningarsamstarv varð orðað og samtykt á tingi í maimánaði í ár.

Við teirri fíggjarligu og fyrisitingarligu orku, ið avsett er til økið, er skilabest at arbeiða eftir einum breiðum leisti fyrstu árini. Í hesum sambandi verður dentur lagdur á at skapa altjóða sambond, eitt nú við stjórnir og hjálparfelagsskapir, ið arbeiða við menningarsamstarvi.

Ætlanin við lógini um altjóða menningarsamstarv er at stuðla menningarlondum at basa fátækradømi og at skapa føroyskan kunnleika, royndir og áhuga fyri triðja heiminum og

altjóða viðurskiftum sum heild. Hetta gerst við at finna samstarvspartar og verkætlanir, ið geva føroyskum einstaklingum, felagsskapum, stovnum og virkjum høvi at bjóða førleikar sínar fram.

Í dag samstarva Føroyar við Heimsbankan, CARE Peru, Mercy Corps og íslendska menningarhjálparstovnin Iceida um ymsar verkætlanir, har arbeitt verður við ítøkiligum møguleikum hjá Føroyum at hjálpa menningarlondum við fíggjarligum ella yrkisligum stuðli.

## Marknamál

Marknasetingin á havleiðum Føroya heldur fram. Higartil eru marknasáttmálar gjørdir við Noreg og Bretland. Í 2003 varð politisk semja gjørd við Ísland um markið, og henda semja verður væntandi staðfest í einum altjóðarættarligum marknasáttmála antin seinni í ár ella næsta ár.

Tá ið ræður um landgrunsmarkið uttan fyri tveyhundrað fjórðingar, hava Føroyar, Ísland og Noreg sett fram krøv um økið norðan fyri Føroyar. Harafturat hava Føroyar, Ísland, Bretland og Írland sett fram krøv um økið í ein útsynning úr Føroyum. Í løtuni verða vísindaligar rannsóknir gjørdar í báðum økjum til at nýta sum føroyskt próvtilfar í landgrunsnevndini hjá Sameindu tjóðum. Viðvíkjandi norðara økinum hava avvarðandi londini eisini havt tætt samskifti um, hvussu tey kunnu býta økið sínámillum í framtíðini.

## Trygdarpolitisk mál

Av trygdarpolitiskum málum, ið hava verið á breddanum seinasta árið, eru málini um fangaflogfør, Loranstøðina á Eiði og herstøðina á Sornfelli.

Danski uttanríkisráðharrin hevur higartil ikki kunnað váttað, at honum vitandi hava fangaflogfør flogið um føroyskt loftrúm. Málsøkið flogferðsla er ikki yvirtikið, og føroyingar kunnu tí einans spyrja seg fyri hjá donskum myndugleikum um tílík mál. Eingin ivi er um, at sama um málsøkið er føroyskt ella danskt, so kann verða sera trupult at staðfesta, hvørt fangaflutningur er í loftrúmi okkara ella ikki.

Eftir at avgerð varð tikin um at taka Loranstøðina á Eiði niður, hevur Frakland víst áhuga fyri, at støðin heldur fram við virksemi sínum. Hon tykist annars at hava serligan týdning fyri Galileoverkætlanina, ið fevnir um eina røð av fylgisveinum og loranstøðum, sum í felag skulu tryggja skipum, flogførum, akførum og øðrum neyva staðkenning.

Avgjørt er at minka munandi um virksemið á herstøðini í Mjørkadali, og einans tær lívsneyðugu tænasturnar til danska herflotan í Føroyum halda fram. Í hesum sambandi verður farið í holt við at taka radaran niður um ársskiftið, av tí at hann lítlan og ongan strategiskan týdning hevur longur. Hann hevur kortini havt stóran týdning fyri ferðamannaflogfør, og tí verður kannað, um til ber at seta upp annan radara, ið er egnaður til slíka ferðslu. Gjørt verður vart við, at radarin á Sornfelli er ogn hjá bretsku stjórnini. Hann er lutfalsliga dýrur at reka og er tøkniliga aveldur samanborið við nýggjar radarar, ið eru gjørdir til ferðamannaflogfør burturav.

## Sendistovur

Sendistovurnar hava ein týdningarmiklan leiklut í økta uttanríkispolitikki Føroya. Í fjør varð víst á, at skulu vit gera okkum vón um veruligt uttanríkispolitiskt samstarv og búskaparligar sáttmálar við onnur lond, so mega vit styrkja sendistovurnar. Landsstýrið hevur tí sett ein sendifulltrúa afturat í Brússel og umhugsar eisini at útvega sær egin høli í hesum umráðandi

býi. Sendistovurnar í London og í Keypmannahavn hava somuleiðis virknan leiklut í uttanríkispolitikki og virka fyri føroyskum vinnu- og mentanaráhugamálum í útlondum.

# Fíggjar- og búskaparmál

## Búskapargongd

Tað gongur væl við føroyska búskapinum, arbeiðsloysið er lítið og inflasjónin er ikki høg. Eftir at stígur var í búskapinum í nøkur ár, kom rættilig gongd á aftur í seinnu helvt av 2005, og vøksturin stendur við. Tað eru privatu vinnurnar sum heild og serliga tilfeingisvinnurnar, sum nú bera vøksturin. Betri fiskaprísir á altjóða marknaðinum eru høvuðsorsøkin til økta virksemið í tilfeingisvinnunum.

Onnur orsøk til stóra vøksturin í virksemi og eftirspurningi seinastu mánaðirnar eru nýggjar sethúsafíggingar. Fyrr fíggjaðu føroyingar sethús síni við vanligum bankalánum yvir 15-20 ár, men fyri árskiftið beyðst høvi at fíggja við 30-ára veðhaldsláni. Hetta skapti samstundis stóra kapping millum føroysku peningastovnarnar, og renta og lánstreytir sum heild eru vorðin nógv lagaligari. Sethúsaeigarar hava tí fingið nógv meira tøkan pening til dagliga húsarhaldið, og hetta sæst aftur í stórum vøkstri í eftirspurninginum eftir t.d. bilum og øðrum varandi nýtsluvørum.

Lagaliga sethúsafíggingin hevur eisini havt við sær, at húsaprísirnir eru munandi uppfarnir, serliga í høvuðsstaðarøkinum, har eftirspurningurin eftir íbúðum og handverkarum eisini er nógv størri enn útboðið. Tí er ógvuliga torført at útvega sær bústað í hesum øki, serliga hjá støkum, men Landsstýrið ætlar at bøta um henda trupulleika við bústaðarpolitikki sínum.

Umframt nógva virksemið í privatvinnuni, eru útreiðslurnar til rakstur og íløgur hjá kommununum eisini vaksnar nógv seinastu árini. Kommunurnar eru helvtin av tí almenna og mega tí, saman við landinum, vísa samfelagsábyrgd, so at búskapur okkara verður ikki yvirupphitaður, nú so nógv virksemi er hjá tí privata.

Førdi fíggjarpolitikkurin hevur eydnast væl. Ríkin hevur verið ein arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkur fyri at fáa gongd á aftur búskapin, og tí hevur hall verið á fíggjarlógini. Nú vøkstur er íkomin, verður lagt um, og málið í 2007 er at fáa avlop aftur. Tí er sera umráðandi at landið ansar væl eftir útreiðslum sínum, so at tað ikki ovstimbrar búskaparliga virksemið. Hetta samsvarar eisini við ásetingarnar í samgonguskjalinum um at fáa avlop á fíggjarlógina og at tálma sveiggjum í búskapinum.

## Einskiljingar

Landsstýrið hevur seinasta árið raðfest arbeiðið við einskiljingum frammarlaga. Framtaksgrunnurin hevur selt Føroya fiskavirking, og fiskivinnan á landi er aftur á privatum hondum. Farmaleiðir vórðu somuleiðis seldar fyrr í ár. Hetta var leingi ætlanin, tí virksemið var í beinleiðis kapping við privat feløg og gekk eisini ímóti kappingarlóggávuni.

Trý einskiljingarmál vórðu viðgjørd á Løgtingi í vár. Heimild er nú fingin at einskilja Føroya banka og Føroya lívstrygging, og somuleiðis er heimild fingin at fara undir at einskilja Atlantsflog. Ætlandi verða 33% av partabrøvunum í Atlantsflogi seld í ár, og helvtin av partabrøvunum í Føroya lívstrygging verður latin tryggingartakarunum. Hin helvtin verður seld øðrum íleggjara. Lógaruppskot um at selja Føroya tele verður lagt fyri tingið í heyst, og ætlandi verður farið at selja í 2007.

Umframt at gera greitt mark millum tað almenna og tað einskilda, kann væntast, at einskiljingarnar fara at geva almennu fyritøkunum størri frælsi til virðisskapan. Hetta fer óivað at skapa vinnuligt áræði, til gagns fyri alt samfelagið.

Semja er um, at tann peningur, sum vinst við einskiljingunum, skal ikki fara til almenna nýtslu, men til at niðurgjalda almenna skuld. Einskiljingarnar verða gjørdar í eini skipaðari tilgongd við hygni fyri samfelagsligum áhugamálum.

## Bruttotjóðarúrtøka

Bruttotjóðarúrtøka okkara verður uppgjørd í ársins prísum, og tjóðarroknskapartølini verða kunngjørd hálvtannað ár eftir árslok. Føroyski tjóðarroknskapurin og bruttotjóðarúrtøkan vísa tí ikki aktuellu búskapargongdina, og tí verða lønarhagtølini mangan nýtt í staðin.

Í 2005 vóru samlaðu lønargjaldingarnar 6,1 mia. kr. Hetta eru 172 mió. kr. (2,9%) meira enn í 2004. Mest vuksu tær í almennari fyrisiting og tænastum (88 mió. kr), og næstmest í fiskiskapi (57 mió. kr). Lønargjaldingarnar vuksu eisini í sjóflutningi, øðrum flutningi og vinnuligum tænastum. Tær minkaðu 32 mió. kr. hjá ali- og kryvjivirkjum og 16 mió. kr. hjá fiskivøruídnaði.

Samlaði lønarvøksturin í 2005 var tann størsti síðan 2002, men tó væl lægri enn fyrstu árini í hesi øld. Í 2001 var hann 13,7% størri enn í 2000.

Vøksturin í lønargjaldingunum byrjaði í august 2005 og stendur við. Fyrsta ársfjórðing í ár var hann 124 mió. kr. ella 9% størri enn somu tíð í fjør. Lønargjaldingarnar fóru upp um 1,5 mia. kr., sum er met fyrsta ársfjórðing.

Almennu lønirnar bera ikki longur vøksturin í lønargjaldingunum, og almenni lønarvøksturin hevur seinastu mánaðirnar verið hin minsti í fimm ár. Vøkstur hevur verið í øllum vinnugreinum uttan alivinnuni. Kortini skal sigast, at lønargjaldingarnar í alivinnuni vóru ikki minni enn síðsta ársfjórðing í fjør. Hetta kann benda á, at vend er við at koma í hjá alivinnuni. Annars hevur vøkstur verið í tilfeingisvinnunum tríggjar ársfjórðingar á rað eftir eina støðuga minking teir seinastu ellivu ársfjórðingarnar.

## Fólkatal

1. apríl 2006 búðu 48.258 fólk í Føroyum. Fólkatalið vaks nógv frá 1997 til 2002, tá ið tað øktist 1,8% samanborið við árið fyri. Síðan 2002 er árliga vakstrarprosentið minkað, og við ársbyrjan 2005 var tað komið niður á 0,3%. Við árslok 2005 var vøksturin vendur til afturgongd á 0,3%. Hetta eru 127 fólk.

Síðan 1998 er árliga tilflytingin støðugt minkað, og frá 2001 er fráflytingin harafturat vaksin. Árliga nettotilflytingin er tí minkað á hvørjum ári síðan 2001. Í 2004 fluttu 150 fólk fleiri av landinum enn til landið, og í 2005 vóru tey 422.

Fólkatalið minkaði tó ikki meira enn 127 fólk, tí føroyska burðaravlopið er stórt. Síðan 2002 hevur tað verið rímiliga støðugt, nakað oman fyri 700 børn um árið. Burðartíttleikin er um 15 fyri hvørji 1000 fólk. Hetta er nógv, um sammett verður við grannalondini. Í Danmark og Noregi liggur hann um 12 og í Svøríki um 11. Í 2005 fingu føroysk konufólk í barnførum aldri 2,62 børn í miðal. Hetta er tað mesta síðan 1990 og eisini tað mesta í Evropa.

Tekin eru nú um, at nettofráflytingin seinastu árini er um at venda til eina nettotilflyting.

## Arbeiðsloysi

Í februar 2005 var arbeiðsloysið tað mesta síðan aldarskiftið, tá ið yvir 1.200 fólk vóru fulltíðararbeiðsleys. Støðan batnaði síðan fram til juni 2005 og stóð so við fram til januar í ár, tá ið hon batnaði enn meira. Í mai vóru 792 fulltíðararbeiðsleys. Hetta eru 29 færri enn í apríl og 104 færri enn í mars. Arbeiðsloysisprosentið minkaði samsvarandi úr 3,1% í mars niður í 2,8% í mai.

Yvirhøvur eru færri mannfólk arbeiðsleys enn konufólk. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið hjá mannfólki var 2,0% og hjá konufólki 3,7. Mesta arbeiðsloysið hevur seinastu fimm árini verið í Suðuroy, men frá apríl til mai fór arbeiðsloysið í Norðuroyggjum uppum, úr 3,9 upp í 4,1%. Í Suðuroy minkaði tað úr 4,2 niður í 4,0. Har er tað serliga minkað hjá konufólki, niður í helvt eftir einum ári. Í mai var tað komið niður á 6,2%, sum er minni enn hjá konufólki í Norðuroyggjum, har tað var komið upp á 6,5.

Føroyska arbeiðsloysið er niðan fyri 3%, og tað er lítið samanborið við flestu Norðurlond. Í Íslandi er tað 1,6%, í Noregi 3,8, í Danmark 4,5, í Svøríki 4,9 og í Finnlandi 7,8. Í ES er arbeiðsloysið í miðal 8,6.

## Brúkarapríistal

Fyrsta ársfjórðing í ár vóru brúkaraprísirnir í miðal 0,9% hægri enn somu tíð í fjør, og annan ársfjórðing í miðal 2,2% hægri. Hetta er fittur vøkstur, men samanumtikið hevur inflasjónin verið tann sama sum í hinum Norðurlondunum, ið ikki hava stóra inflasjón. Tá er Ísland ikki uppítalt.

Árligi prísvøksturin hevur verið størstur í høvuðsbólkunum flutningi (4,7%), býli (3,8), rúsdrekka og tubbaki (3,5) og mati og drekka (2,8). Príslækkingin hevur verið mest í høvuðsbólkunum frítíð og mentan (-1,6) og innbúgvi, húsbúnaði o.tíl. (-1,5).

Teir nýtslubólkar, sum hava ávirkað brúkarapríistalið mest uppeftir seinasta árið, eru brenniolja til húsarhald (+1,14 prosentstig), brennievni til akfør (+0,43), tubbak (+0,23) og kjøt (+0,24). Bólkarnir, sum hava ávirkað talið mest niðureftir, eru undirbólkarnir rentuútreiðslur fyri íbúðalán (-0,67) og frítíðarferð uttanlands (-0,22).

Frá fyrsta til annan ársfjórðing vaks brúkarapríistalið 1,6%, úr 104,5 upp í 106,2. Størsta orsøkin eru býlisútreiðslur og hægri prísir á brennievni og matvørum. Prísvøksturin í nýtslubólkinum býli hevur í miðal verið 4,5%, og rentan á íbúðalánum er hækkað 6,4%. Hetta hevur ávirkað brúkarapríistalið 0,31 prosentstig uppeftir. Prísurin á brenniolju til húsarhald er hækkaður 8,3% (+0,47), viðlíkahald av bústaði er hækkað 2,1% (+0,06), og húsaleiga er hækkað 2% (+0,05). Prísurin á brennievni til akfør er hækkaður 7,3% og hevur ávirkað brúkarapríistalið 0,24 prosentstig uppeftir. Prísirnir á mati og drekka eru hækkaðir 1,1% seinasta ársfjórðingin. Hetta hevur ávirkað talið 0,24 prosentstig uppeftir.

## Innflutningur av vørum

Innflutningurin minkaði munandi frá 1988 til 1993, men vaks so í stórum fram til 2000, tá ið steðgur kom í aftur. Hevur skipainnflutningurin verið rættiliga stórur seinastu árini, var hann so at siga eingin í 1990-árunum. Verða skipini ikki uppítald, er innflutningurin minkaður spakuliga frá 2001 til 2005, serliga til vinnuliga nýtslu. Talan er bæði um rávøru til vinnuliga nýtslu og um vinnuligan innflutning av maskinum.

Innflutningurin til húsarhaldsnýtslu minkaði undir kreppuni; helst tí at fólkatalið minkaði nógv og tí at minni og ódýrari vøra varð innflutt. Frá 1993 til 2002 vaks innflutningurin

aftur støðugt og hevur síðan staðið at kalla í stað. Seinastu mánaðirnar er hann tó vaksin aftur.

Seinasta árið eru prísirnir á oljuúrdráttum nógv uppfarnir, og hetta sæst týðiliga aftur í innflutningstølunum. Í 2005 vórðu innflutt 237.000 tons av oljuúrdráttum afturímóti 250.000 í 2004. Innflutningsvirðið var 692 mió. kr. í 2005 og 508 mió. kr. í 2004. Nøgdin minkaði sostatt 13 tons, men virðið vaks 184 mió. kr. Í 2004 var miðal innflutningsprísurin 1.927 kr. fyri tonsið av kyndingarolju, og í 2005 var hann 2.808 kr. Hetta er ein vøkstur á 881 kr. ella 46%. Fyri bensin var vøksturin 884 kr. (36%) og fyri dieselolju 1.018 kr. (43%).

Fyrstu fimm mánaðirnar í ár var innflutningurin 1,7 mia. kr. Hetta eru góðar 200 mió. kr. ella 15% meira enn somu tíð í fjør. Nógv tann størsti vøksturin hevur verið í innflutninginum av oljuúrdráttum. Í flestøðrum vørubólkum hevur hann verið javnur.

Samanborið við undanfarin ár er tað bara í 2001 at innflutningurin hevur verið størri fyrstu fimm mánaðirnar av árinum, um skip og oljuúrdráttir ikki verða uppítald. Kemur oljan afturat, er hetta nógv tað størsta innflutningsárið. Hóast innflutta nøgdin av kyndingarolju er 15% minni fyrstu fimm mánaðirnar í ár enn somu tíð í fjør, so er virðið 17% størri. Miðalprísurin fyri tonsið av olju hevur higartil í ár verið tvífalt so høgur sum somu mánaðir 10 tey seinastu árini. Miðalprísurin fyri tonsið av kyndingarolju hevur higartil í ár verið 3.600 kr. afturímóti 2.600 kr. somu mánaðir í fjør. Fyrstu fimm mánaðarnar í 2004 var innflutningsprísurin á kyndingarolju helvtina av tí hann hevur verið í ár.

## Útflutningur av vørum

Um 95% av vøruútflutningi okkara eru fiskur og fiskavørur. Síðan 1980 er fiskaútflutningurin vaksin í virði og nøgd. Í 2005 var nøgdin um tvær ferðir so nógv sum í 1980 og virðið næstan fýra ferðir so nógv.

Hesi árini er tvær reisur komið fyri, at bæði nøgd og virði eru minkað. Fyrru ferð millum 1991 og 1995, tá útflutningurin minkaði 25% í virði, úr 2,6 mia. kr. niður í 2 mia. kr. Seinnu ferð millum 2001 og 2005, tá ið hann minkaði 20% í virði, úr 4,2 mia. kr. niður í 3,4 mia. kr.

Fyrstu fimm mánaðirnar í ár var útflutningsvirðið 90 mió. kr. ella 6% minni enn somu tíð í fjør. Orsakirnar til minkingina eru fyrst og fremst vánaligi toskafiskiskapurin, lítla framleiðslan av alifiski og minkaða rækjuveiðan. Minkingin í útflutningsvirðinum fyri hesar tríggjar vørubólkar er samanlagt um 280 mió. kr. Harafturímóti er meira fiskað og framleitt av serliga upsa, hýsu og øðrum fiskasløgum sum t.d. havtasku. Av upsa, hýsu og øðrum fiski er útflutt fyri 170 mió. kr. meira enn somu tíð í fjør.

Av tí at prísirnir fyri allarflestu fiskasløg og vørusløg hava verið betri í ár, er minkingin í virði ikki so stór sum minkingin í útfluttum nøgdum. Minkingin í útfluttum nøgdum av fiskavørum var samanlagt 28% fyrstu fimm mánaðirnar í ár í mun til somu tíð í fjør. Í virði var minkingin kortini bert 7% ella slakar 100 mió. kr. Prísirnir á týdningarmestu fiskasløgunum og framleiddu vørunum eru uppfarnir síðan í fjør. Prísirnir eru yvirhøvur av tí allarbesta í nógv ár, og hetta ber upp fyri minkingini í veiddum og framleiddum nøgdum.

Nýggj lóg um útflutning fór at virka frá 1. januar 2006. Fyrr vóru at siga bara fiskur og fiskaúrdráttir skrásettir í hagtølunum, og fyri 1. januar vóru sostatt í miðal 150 ymisk vørunummur skrásett hvønn ársfjórðing. Nú eru tey 240. Mett verður, at einar 150 mió. kr. av føroyska útflutninginum vóru óskrásettar, áðrenn nýggja lógin kom í gildi. Sum dømi kann nevnast, at fyrstu fimm mánaðirnar í ár varð útflutt fyri 30 mió. kr. av oljuúrdráttum. Av hesum varð einki skrásett frammanundan. Útflutt varð fyri 14 mió. kr. í trolreiðskapi. Av

hesum vórðu millum 5 og 6 mió. kr. skrásettar árini frammanundan. Útflutt var fyri 4 mió. kr. í burturkasti, sum ikki hevur verið skrásett frammanundan.

## Handilsjavni

Í 2005 var hallið á føroyska handilsjavnanum 675 mió. kr. Innflutningurin var slakar 4,3 mia. kr., sum var ein hálv milliard meira enn í 2004. Útflutningurin var 3,6 mia. kr. ella 100 mió. kr. minni enn í 2004.

Býtislutfallið verður vanliga nýtt at lýsa samhandilin við útheimin. Føroyska býtislutfallið vísir, um vit fáa meira ella minni av innflutningi fyri hvørja eind av útflutningi. Tá ið býtislutfallið minkar, fæst minni innflutningur til keyps fyri hvørja eind av útflutningi.

Av tí at útflutningsprísirnir fullu og innflutningsprísirnir vuksu frá 2002 til 2004, fall býtislutfallið hesi árini. Í 2005 vendi gongdin aftur, tí at útflutningsprísirnir vuksu meira enn innflutningsprísirnir.

## Ogn og skuld uttanlands

Føroyska bruttoskuldin uttanlands var 6 mia. kr. í 2004. Hetta er eitt lítið vet minni enn í 2003, men 200 mió. kr. meira enn í 2002, tá ið hon var 5,8 mia. kr. Føroyska bruttoognin var 9,4 mia. kr. í 2004. Hetta er eisini eitt sindur minni enn í 2003, men 800 mió. kr. minni enn í 2002, tá ið hon var 10,2 mia. kr. Hetta svarar til, at nettoognin uttanlands var um 3,4 mia. kr. í 2004 og 2003, og 4,4 mia. kr. í 2002. Nettoognin er sostatt minkað 1 mia. kr. frá 2002 til 2004. Orsøkin er, at samlaða ognin er minkað, av tí at skuldin hevur verið næstan óbroytt hesi árini.

## Eftirlønarmál

Arbeitt verður við eini framtíðar eftirlønarskipan fyri Føroyar. Endamálið er at skipa viðurskiftini soleiðis, at vit fáa eina fíggjarliga haldføra eftirlønarskipan, sum tryggjar øllum eftirlønarfólki ein virðiligan og góðan aldurdóm.

Avbjóðingin er hin sama hjá okkum sum hjá øðrum. Tað verða færri fólk í arbeiðsførum aldri og fleiri eldri. Samstundis økist vælferðin, og tað leggur størri trýst á vælferðartænasturnar frá tí almenna. Skal vælferðin ikki minka í framtíðini, ella skal skatturin ikki hækka munandi, má persónliga eftirlønaruppsparingin í Føroyum økjast nógv.

Endalig niðurstøða er ikki enn gjørd um, hvussu skipanin skal verða, men arbeitt verður út frá tilmælinum hjá Heimsbankanum, ið byggir á tríggjar súlur: Eina skattafíggjaða fólkapensión, sum skal tryggja tey gomlu móti fátækradømi, eina tvungna einstaklingauppsparing hjá tí privata og eina sjálvbodna einstaklingauppsparing.

## Mál- og avriksstýring

Farið er undir at seta mál og avriksstýring í verk fyri tað almenna. Í dag verður stýrt við karmum, har stovnar og ráð fáa tillutaðan ein fíggjarkarm, sum tey hava skyldu at halda.

Við mál- og avriksstýring skulu stjórnarráð saman við stovnum seta yvirskipað mál fyri tær uppgávur, sum stovnarnir eru settir at greiða. Eitt yvirskipað mál kann liðast sundur i fleiri lutmál, sum mugu verða avrikað fyri at røkka yvirskipaða málinum. Saman verður hetta nevnt mál- og avriksstýring.

Høvuðsamboðið í mál- og avriksstýring er ein avrikssáttmáli, ið er skrivlig avtala millum stjórnarráð og stovn um, at hesin skal røkka ávís mál og avrika ávís viðurskifti í einum fíggjarári. Eyðvitað skulu ásettir fíggjarkarmar eisini haldast í framtíðini, men nú fer meira dentur at verða lagdur á, hvat fæst fyri játtaða peningin.

# Fiskivinnu- og sjóvinnumál

## Fiskidagar og hjáveiða

Fyri fiskiárið 2006/2007 verður skotið upp at lækka fiskidagatalið á landgrunninum 3% fyri bólkarnar 3, 4 og 5. Á Føroya banka eiga fiskidagarnir at vera munandi færri, tó ikki hjá bátum í bólki 5.

Mangan hevur verið ført fram, at vit hava ikki greitt hjáveiðuspurningin í uppsjóvarfiskiskapi, serliga eftir svartkjafti. 1. januar 2007 verða munandi broytingar á hesum øki, tí tá verður skiljirist í svartkjaftatroli eitt krav, samstundis sum kunngerð verður lýst, ið skipar økini, har loyvt verður at veiða svartkjaft. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan hjáveiðu og fyri at gera tað lættari hjá ymsu skipabólkunum at leggja veiðu sína til rættis.

## Lóg um vinnuligan fiskiskap

Nevndin, ið varð sett seinasta ár at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, hevur lagt ein samandrátt av arbeiðinum fyri landsstýrismannin í fiskivinnumálum og fylgibólkin, ið er mannaður við eitt nú vinnuumboðum, og sum varð settur samstundis, sum nevndin fór til verka. Í august/september verður alt tilfarið lagt fyri landsstýrismannin. Arbeiðið hjá nevndini verður býtt í tveir partar. Annar er ein gjøgnumgongd av sjálvum lógartekstinum, hin er eitt beinleiðis uppskot til lógarbroytingar. Landsstýrismaðurin fer at viðgera tilfarið og evna til eitt endaligt lógaruppskot at leggja fyri Løgtingið. Tilfarið verður somuleiðis viðgjørt av fylgibólkinum. Ætlandi verður uppskotið lagt fyri tingið seinni í hesi setu.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum kunnaði stutt fyri ólavsøku samgonguna um nevnda samandrátt og frá ætlan sín. Ætlanin fevnir um broytingar á mongum økjum, teirra millum:

- Staðfesting av ognarrætti, sum fevnir um uppsøgn av veiðiloyvum, brúksskyldu, tilfeingisgjald og møguleika hjá tí almanna at selja fiskirættindi.
- Fiskiorku og fiskirættindi, sum fevna um veiðiloyvi, smidligari umsiting av fiskorku, avhending millum veiðibólkar og greiðari reglur fyri bólk 5.
- Lógarverk, sum fevnir um at skipa alt lógarverkið í fýra høvuðslógir, báta- og skipamát, kanning av ognarrætti og ymsar grundleggjandi orðingar í lógini.

Harnæst umfatar ætlanin eisini lógaruppskot á nýggjum øki so sum:

- Annað havtilfeingi, sum fevnir um ílegu og ílegueginleikar.
- Kærunevnd og kærumøguleikar.

## Millumlandasamstarv og samráðingar um fiskivinnumál

Almenni áhugin fyri fiskiskapi hevur ongantíð verið so stórur kring heimin sum nú, og fiskiskapur er vorðin afturvendandi evni á ST-aðalfundinum. Í juni varð farið at endurskoða ST-sáttmálan frá 1995 um at varðveita og umsita millumøkja fiskastovnar og ferðandi fiskastovnar, og í ár varð eisini farið undir nýggja tilgongd í ST at viðgera lívfrøðiligt fjølbroytni í altjóða sjógvi.

Tíverri er rákið alt oftari merkt av kenslubornum og illa grundaðum lýsingum av fiskiskapi sum stórari umhvørvishóttan. Dømi er átakið at banna botntroling í altjóða sjógvi, har als ikki verður hugsað um, hvussu umráðandi havsins tilfeingi er sum matvøra, og at tað er lívsgrundarlag hjá nógvum londum og samfeløgum kring heim. Samstundis gerast marknaðarkrøvini um burðardygga stovnsumsiting alt sjónligari, sum tíðin gongur. Tí ræður um hjá okkum at leggja størri dent á at kunna umheimin betur um føroyska fiskivinnu, og hesum fer Landsstýrið at arbeiða miðvísari við.

Fiskivinnusamstarvið í Matvøru- og landbúnaðarfelagsskapi ST, FAO, er góður samskiftispallur hjá heimsins fiskivinnulondum og gevur høvi at gera felags reglur um burðardyggan fiskiskap, aling, handil við fiskavørum o.a. Landsstýrið fer at arbeiða fyri føroyskum atlimaskapi í FAO, eins og vit hava í Sjóvinnufelagsskapi ST, IMO. Atlimaskapur fer at geva okkum virknari og sjónligari leiklut sum fiskivinnutjóð í heimshøpi.

Tá ið talan er um felags fiskastovnar í Norðuratlantshavi, leggur Landsstýrið framvegis stóran dent á at styrkja samstarvið um hesar stovnar, so at teir verða nýttir burðardygt.

Hóast framstig eru gjørd seinastu árini, so eru enn týdningarmiklir felags fiskastovnar, sum eingin nøktandi skipan er fyri, serliga norðhavssild og kongafiskur í Irmingarhavinum. Hetta skerjir eisini møguleikarnar hjá londunum í NEAFC at basa ólógligum fiskiskapi. Tó eru átøk hjá NEAFC farin at gera mun, sum t.d. at nokta skipum at koma í havn, um tey fiska ólógliga í NEAFC-øki.

Alt meira verður nú hugsað um, hvussu fiskiskapur ávirkar vistskipanir í havinum. Hetta hevur m.a. havt við sær, at NEAFC nýliga hevur tikið stig til at dagføra sáttmálan frá 1980, so at felagsskapurin fær heimild at viðgera fiskiskap í einum breiðari havumhvørvisligum samanhangi. Í NEAFC er nú eisini semja um eina skipan at greiða ósemjur millum limalond, og hesar broytingar í NEAFC-sáttmálanum verða væntandi lagdar fyri Løgtingið til góðkenningar í hesi tingsetu. NAFO er eisini farið undir samsvarandi tilgongd at dagføra sín sáttmála.

Fiskiveiðuavtalur við onnur lond og fiskirættindi í altjóða sjógvi hava stóran týdning fyri føroysk skip. Summar avtalur geva rúm fyri fiskiskapi í fremmandum sjógvi alt árið, aðrar loyva skipum at fylgja ferðandi stovnum, so at tey kunnu gagnnýta veiðimøguleikar sínar sum best. Landsstýrið leggur dent á at varðveita og styrkja hesar avtalur og at menna aðrar møguleikar.

## Samráðingar og avtalur fyri 2006

Í samráðingunum millum strandarlondini um sínámillum fiskiveiðuavtalur fyri 2006 var størsta framstig, at tað loksins varð komið ásamt um, hvussu svartkjaftastovnurin skal verða umsitin.

Sum treyt fyri sínámillum avtaluni við Noreg kravdu norðmenn at fiska stóran part av svartkjaftakvotu síni í føroyskum sjógvi, men eftir tvey samráðingarumfør slakaðu teir tó heilt nógv við hesum. Partur av semjuni er eisini, at føroysk skip kunnu fiska 2% av kvotu síni í norskum sjógvi, umframt at tey kunnu fiska at siga alla ta tøku makrelkvotuna í norskum sjógvi.

Samráðingarnar við ES gingu rímiliga væl, tá ið havt verður í huga, hvussu illa ídnaðarfiskastovnarnir í Norðsjónum eru fyri. Tó, heldur ikki hesa ferð eydnaðist at fáa nøktandi veiðimøguleikar til ídnaðarskipini í hesum øki. Í vár gjørdu Føroyar og ES ískoytisavtalu um at loyva avmarkaðari svartkjaftaveiðu hjá hvør øðrum.

Avtalurnar við Noreg og Russland tryggjaðu okkum somu botnfiskakvotur í Barentshavinum sum í 2005.

Veiðimøguleikarnir eftir botnfiski undir Íslandi eru eisini teir somu sum áður. Lodnustovnurin er illa fyri, og ivasamt er, um vit varðveita kvotu okkara í íslendskum sjógvi komandi vertíð.

Heldur ikki hesa ferð vildu íslendingar loyva føroyskum skipum at virka lodnu undan Íslandi til matna. Teir vildu umhugsa støðu sína men hava síðan boðað frá, at enn verða avmarkingarnar ikki broyttar, av tí at fiskifrøðingar eru ivasamir um lodnustovnin, og tí er stór óvissa um framtíðarætlanirnar við lodnuni. Høvuðsmálið hjá okkum er tó at tryggja, at grundreglan um frælsan handil landanna millum verður vird, og tí eru hesi viðurskifti enn eina ferð tikin upp við Ísland á politiskum stigi. Í hesum sambandi skal verða nevnt, at handils- og fiskivinnusamstarvið við Ísland heldur ikki virkar nøktandi, tá ið ræður handil við feskum botnfiski landanna millum. Føroyska sjónarmiðið er, at fiskur skal kunna keypast og seljast millum Ísland og Føroyar uttan nakrar forðingar. Íslendingar krevja tó framhaldandi, at íslendskur fiskur, ið seldur verður í Føroyum, bert kann seljast um góðkenda uppboðssølu. Hetta krav er ikki í samsvari við føroysku tulkingina um frælsan handil, og tískil má málið takast upp til nýggja viðgerð.

Samráðingarnar við Grønland fyri 2006 hava verið truplar. Grundað á krav okkara í strandarlandasamráðingunum um kongafisk í Irmingarhavinum vildu grønlendingar undir sínámillum samráðingunum í desember 2005 ikki gera fiskiveiðuavtalu við Føroyar fyri 2006. Fyrr í summar var samband landanna millum á politiskum stigi. Farið varð aftur til samráðingarborðið fyrst í juli, tá ið semja loksins fekst um avtalu fyri 2006. Kongafiskur er nú hildin uttan fyri avtaluna. Hóast avtalan sum heild er lítil í vavi, m.a. orsakað av vánaligu støðuni hjá botnfiskastovnum undir Grønlandi, leggur Landsstýrið framvegis dent á at varðveita og menna eitt gott samstarv við grønlendingar á fiskivinnuøkinum.

Samráðingar millum Føroyar, Ísland og Grønland um kongafiskin í Irmingarhavinum halda áfram. NEAFC gjørdi eins og í fjør eina semju, sum ásetir heildarkvotu í 2006, tó uttan at býta hana millum limalondini. Útlitini fyri stovnin eru sera døpur, um veiðan ikki minkar, og ICES hevur nýliga mælt til at steðga fiskiskapinum heilt í 2007. Tað áliggur Føroyum eins og hinum strandarlondunum at gera sítt til at finna eina varandi loysn um henda fiskastovn, so at hann kann mennast aftur og geva fiskivinnuni eitt burðardygt íkast í longri tíð. Ásannast skal, at fyrstu árini verður neyðugt at tátta munandi í við hesum fiskiskapi.

Heldur ikki fyri 2006 varð nøkur avtala gjørd um at umsita norðhavssildina. Vantandi semjan ger, at limalondini í NEAFC hava ikki skyldu at handhevja reglurnar hjá felagsskapinum um ólógligan fiskiskap hjá ikki-limalondunum í altjóða sjógvi. Skyldina fyri hesa støðu eigur Noreg, sum ikki hevur viljað gjørt samtykt í NEAFC um norðhavssildina.

Ásannandi at ongar avtalur eru um norðhavssild og kongafisk, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gjørt av at loyva føroyskum skipum at fiska sambært teimum rættindum, sum vit meta okkum at hava.

Føroyar hava leingi mótmælt tí ógrundaða og órættvísa rækjubýtinum í NAFO-øki 3L, har øll lond fáa sama lítla part, uttan mun til søguliga veiðu ella veruligan áhuga. Tískil varð aftur í 2006 kvota ásett við støði í føroyska kravinum og í samsvari við mannagongdir og meginreglur hjá NAFO, harav Føroyar hava latið Grønlandi ein minni part. Hetta hevur við sær, at Kanada framvegis ikki loyvir fiskiskipum okkara í havnir sínar, tó at allir ríkispartar hava mótmælt hesum hvassliga á politiskum stigi. Arbeitt verður áhaldandi við at finna eina nøktandi loysn um býtið í NAFO.

## Hvalaveiðumál

Á ársfundinum hjá IWC í junimánaði samtykti lítil meiriluti av limalondunum, teirra millum Danmark, at IWC skal byggja avgerðir sínar á meginregluna um burðardygga gagnnýtslu, og at hvalaveiðubannið frá 1982 eigur at verða avtikið.

Hetta er at fegnast um, tí í fleiri ár hevur almenna kjakið um vinnuliga hvalaveiðu bygt á tað grundarlag, at IWC bannar slíkari veiðu, og at ógjørligt er at tryggja burðardygga gagnnýtslu av stórhvali, hóast fleiri hvalastovnar eru væl fyri. Fer IWC aftur at virka sambært sáttmálanum, kann hetta styrkja hugsanina um, at hvalaveiða er vanlig gagnnýtsla av havsins tilfeingi, ið lond eiga at samstarva um. Hetta hevði havt stóran týdning fyri øll hvalaveiðulond, eisini Føroyar. Tó er framvegis langt á mál at finna teir neyðugu tríggjar fjórðingarnar av limalondunum í IWC, sum skulu til fyri at áseta kvotur fyri vinnuliga stórhvalaveiði.

Samstarvið í NAMMCO at umsita og granska havsúgdjór í Norðuratlantshavi hevur ment seg á fleiri økjum seinastu árini. Vísindanevndin hjá NAMMCO samskipar nú aftur stóra hvalateljing í 2007, og Føroyar vera við í hesum arbeiði sum vant. Tøkniliga samstarvið um, hvussu best er at drepa hval og kóp, er eisini týðandi táttur í arbeiðinum hjá NAMMCO, og eisini á hesum øki hava Føroyar havt virknan leiklut við síni serfrøði og áhaldandi royndum at bøta um skipanir og tøkni í grindadrápi.

## Fiskivinnugransking

Støðug menning í fiskivinnuni er fyritreyt fyri at styrkja um kappingarføri hennara. Tí er ætlanin framhaldandi at tillaga játtanirnar til gransking á fiskivinnuøkinum, so at vinnumenningin gerst miðvísari.

Fiskivinnan er øll grundað á vitan, og henni tørvar støðuga gransking og menning. Vit eiga at leggja stóran dent á at fremja hesar tættir í neyvum samstarvi við vinnuna og við rótfesti í teimum spurningum, sum henni tørvar at greiða.

Útgangsstøðið er, at gransking er drívmegin í at troyta nýggjar møguleikar á sjógvi og á landi. Tí eiga vit at styrkja tann partin av vitanar- og førleikagrundarlagnum, sum byggir á gransking og menning, og arbeiðið eigur at fevna um allar umráðandi vinnutættir - frá grunni at munni.

Ásannandi tann týdning, sum fiskivinnan hevur í samfelagi okkara, er miðvís menning av hesi vinnu ein sjálvsøgd fyritreyt fyri framburði í samfelagi okkara. Landsstýrisins leiklutur er m.a. at raðfesta vitan og fakligan førleika við játtanum til gransking og menning, so at fiskivinnan altíð er í fremstu røð.

## Føroya altjóða skipaskráseting (FAS)

Arbeiðsbólkurin, sum viðgjørdi eina dagføring av FAS, handaði landsstýrismanninum í fiskivinnumálum álit í januarmánaði, og arbeiðið at gera neyðugu tillagingarnar er byrjað. Tá ið arbeiðið er liðugt, verður av álvara farið at marknaðarføra FAS til tess at menna henda inntøkumøguleika okkara.

Níggju skip komu aftur at skipaskrásetingini í 2005. Hetta er at frøast um, serliga tí at tvey teirra eru nýbygningar hjá útlendingum, sum hava valt at skráseta skip síni her. Síðan 2002 eru 19 skip komin aftur at FAS-skipanini og seks eru burturúrfarin, tó einki í 2005. Við árslok 2005 vóru til samans 35 skip í Føroya altjóða skipaskráseting.

### Tilbúgving

Ásannandi at samfelagskrøvini til tilbúgving og tilbúgvingarsamskipan alsamt økjast, varð avgjørt at samskipa virksemið hjá rakstrareindunum: Brunaumsjón landsins, MRCC Tórshavn/Tórhavn radio og Samskipanina fyri tilbúgving. Higartil hava Brunaumsjónin og Samskipanin fyri tilbúgving verið skipað sum deildir í Fiskimálaráðnum, og MRCC Tórshavn/Tórshavn radio hava verið partur av Fiskiveiðieftirlitinum. Hesar rakstrareindir verða nú skipaðar í ein tilbúgvingarmyndugleika, ið fer til verka í næstum.

Sambært samgonguskjalinum skal málsøkið tilbúgving yvirtakast í hesum valskeiði. Tingingar á embætisstigi hava verið við danskar myndugleikar síðan seinasta heyst, og frágreiðing um yvirtøkuna er nýliga skrivað. Uppskot um at yvirtaka málsøkið verður lagt fyri Løgtingið í heyst, og eftir ætlan verður tikið við málsøkinum frá ársbyrjan 2007.

Eingin tilbúgvingarlóggáva er fyri Føroyar uttan lógin frá 1949 um sivilverju, sum varð sett í gildi her við kongligari fyriskipan fyrst í fimmtiárunum. Lógin hevur ongantíð verið virkin og verður heldur ikki hildin at hóska nútíðar tilbúgving. Tað fer at taka eini tvey, trý ár at evna eina hóskandi tilbúgvingarlóggávu til, og til ta tíð kunnu vit klára okkum við ískoytum til lógina um eldsbruna. Ískoytini skulu m.a. lógarfesta økisábyrgdina, t.e. grundregluna um, at tann, ið tekst við eitthvørt virksemi, eisini varðar av tilbúgvingini á økinum. Tey skulu eisini lógarfesta samskipanarheimildina, t.e. rættin hjá landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum at samskipa alla tilbúgvingina og at krevja, at onnur stjórnarráð skulu svara fyri økisábyrgd síni.

Farið verður av álvara undir at gera uppskot til lógarbroytingar í løgtingslógini um brunatrygd, og miðað verður ímóti, at uppskotið kann verða lagt fram seinni í heyst.

### Skipaeftirlit

Arbeiðið hjá Skipaeftirlitinum verður styrkt við eini støðugt øktari játtan til starvsfólk. Í 2006 var játtanin 500.000 kr. hægri enn árið fyri, og skotið verður upp at hækka játtanina til starvsfólk í 2007 eisini.

Til heystar verður kanning sett verk í sambandi við ætlaðu ISO-9000 skipanina, ið er ein innaneftirlitsskipan, sum skal tryggja, at allar skipaðar mannagongdir eru í samsvari við altjóða krøv. ISO-9000 umfatar eisini eina góðkenning av arbeiðinum og førleikanum hjá eftirlitsfólkunum. Uttanveltaður eftirlitsstovnur stendur fyri nevndu kanning.

Í hesum døgum verður arbeitt við eini mannangongd, ið skal tryggja, at altjóða krøv verða lýst og sett í verk sum fráboðanir frá Skipaeftirlitinum. Harafturat er Skipaeftirlitið regluliga við á útvaldum ráðstevnum hjá IMO, og stovnurin er eisini við í regionalum samstarvi í Norðurevropa. Endamálið við hesum virksemi er at menna Skipaeftirlið eftir altjóða leisti, samstundis sum vit støðugt hava dagførdan kunnleika um altjóða rákið á økinum.

## Vinnumál

Vinnupolitikkur Landsstýrisins hevur sum mál at betra um vælferðina hjá einstaka borgaranum og stuðlar upp undir ætlan Landsstýrisins við Visjón 2015.

Vinnupolitikkurin byggir á marknaðarbúskap við vælvirkandi kapping, har politiski myndugleikin setir karmarnar. Annar táttur í vinnupolitikkinum er at tryggja, at gróðrarbotnurin fyri nýskapan er so góður, sum til ber.

Tað er m.a. út frá hesum fyritreytum, at raðfestingarnar á vinnupolitisku økinum fyri komandi tingsetu eru gjørdar, og fevna tær m.a. annað um at menna íverksetan, kt-nýtslu og gransking, umframt at dentur verður lagdur á arbeiðsmarknaðarmál. Dentur verður eisini lagdur á, at vit alsamt útbyggja undirstøðukervi okkara, so at tað gerst skjótari, lættari og bíligari at samskifta og ferðast, bæði í Føroyum og út í heim.

## Vinnulóggáva

Enn sum áður verður arbeitt eftir tí stevnumiði, at grundleggjandi vinnulógirnar – vinnuligu leikreglurnar – skulu vera eins góðar sum í londunum kring okkum. Hetta merkir ofta, at lógirnar skulu fylgja ES-lógum so væl sum gjørligt.

Fleiri av grundleggjandi vinnulógunum verða tí endurskoðaðar eftir hesum leisti, teirra millum roknskaparlógin og partafelagslógirnar. Í framtíðini verða hesar lógir dagførdar javnan, so at tær altíð samsvara við lóggávuna aðrastaðni.

Ætlanin er at leggja uppskot um nýggja kappingarlóg fyri Løgtingið, so at vit fáa somu leikreglur á kappingarøkinum sum flestu av londunum uttan um okkum, m.a. viðvíkjandi samanleggingareftirliti.

Ætlanin er eisini at leggja uppskot um marknaðarføringslóg fyri Løgtingið til tess at áseta minstukrøv til marknaðaratferðina hjá vinnufyritøkum. Her verður hugsað um marknaðarføring við atliti at kappingarneytum og øðrum vinnurekandi og við atliti at brúkaranum og almennum samfelagsáhugamálum.

## Aling

Eftir stóru ILA-trupulleikarnar eru tekin um, at koppsetingin hevur bart niður hesa fiskasjúku, og at tað gongur framá við alingini. Tó er alsamt neyðugt at dagføra reglurnar um sjúkufyribyrging og niðurberjing. Neyðugt er eisini at dagføra eftirlitið, tí nýggjar sjúkur kunnu altíð fara at gera um seg, eins væl og gamlar kunnu koma afturíaftur.

Alilógin verður nú endurskoðað. Roynt verður at bera so í bandi, at aliloyvi skulu ikki liggja ónýtt, og at aliloyvi í framtíðini skulu fella teimum dugnaligastu alarunum í lut. Málið er eisini at dagføra karmarnar við atliti at vinnuligu og tøkniligu menningini á økinum. Ætlandi verður uppskot at broyta alilógina lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

## Landbúnaður og matvørulóggáva

Øll landbúnaðarlóggávan skal sum heild verða endurskoðað, og bólkur er settur at gera hetta arbeiði í tveimum. Í fyrra lagi verður kannað, hvussu almenna umsitingin av landsjørðini kann gerast betri og um ráðiligt er at heimila festarum at keypa festiognir, tó ikki innan- og uttangarðsjørð. Í seinna lagi verður kannað, um ráðiligt er at selja jørð, ið hoyrir til smáfesti, og sum frá líður at selja alla festijørð.

Galdandi matvørulóg frá 1985 eigur at verða dagførd. Í heyst er tí ætlanin at seta sjøtul á arbeiðið at gera nýggja lóg, so at krøvini til føroyska matvøruframleiðslu og matvørutrygd verða tey somu sum í ES.

## Trygging

Tryggingarmarknaðurin í Føroyum er ikki frælsur, tí sum heild kunnu føroyingar ikki tekna tryggingar uttanlands, og útlendsk feløg kunnu ikki reka tryggingarvirksemi í Føroyum.

Føroysk tryggingarfeløg hava eisini avmarkaðar møguleikar at reka tryggingarvirksemi uttanlands, eitt nú í ES og EBS-londum. Hesar avmarkingar eru tó ikki millum Føroyar og Ísland.

Mestsum øll tann føroyska eftirlønaruppsparingin verður sett í útlendsk virðisbrøv. Hetta kemst millum annað av lógarkravinum um, at slík uppsparing kann bert setast í virðisbrøv, ið skrásett eru á virðisbrævamarknaði. Tí ber ikki til at seta peningin í føroysk aktiv.

Tær ítøkiligu vinnupolitisku ætlanirnar á tryggingarøkinum fevna um hesi tiltøk:

- Tryggingarlóggávan skal dagførast og samsvara við ES-lóggávu. Uppskot verður lagt fyri tingið í hesi setu.
- Útlendsk tryggingarfeløg skulu kunna virka í Føroyum og bjóða føroyingum tænastur sínar. Samstundis fáa føroysk tryggingarfeløg atgongd til útlendska marknaðin.
- Føroyingum skal standa frítt at tekna tryggingar uttanlands.
- Lættari skal verða at seta eftirlønaruppsparing í óskrásett virðisbrøv, tó í samsvari við váðan, ið kann standast av hesum.

## Vinnugransking

Gjørd er byggiskrá fyri ætlaðu granskaraparkina, og søkt er um byggiloyvi til tess at kunna prosjektera og bjóða út arbeiðið.

Hugsanin er at leggja dent á tey øki, har føroysk gransking hevur fyrimunir fram um aðra gransking. Eitt nú verður hugsað um nýtslu av biotøkniligum arbeiðsháttum í sambandi við matvøruframleiðslu (fiskur og fiskaúrdráttur), djóraheilsu (alifiskur) og mannaheilsu (ílegugransking og heilivágsframleiðsla).

Granskaraparkin skal eftir ætlan hava ein miðsavnandi leiklut at handilsgera granskingarúrslit og skal gera sítt til, at føroyskar fyritøkur, vørur og tænastur standa seg í altjóða kapping. Harumframt er ætlanin, at granskaraparkin skal verða markamót millum verandi vinnu, hægri nám, granskingarumhvørvi og íverksetarar.

## Ætlan fyri íverksetan

Ætlan er gjørd fyri, hvussu vit kunnu menna Føroyar til eitt áhugavert stað hjá virkisfýsnum fólki at byrja nýggja vinnu. Farið verður nú at fremja hesa ætlan, sum sigur, at:

- Eitt fjøltáttað útbúgvingarverk skal vera virkin partur í at ala fram ein íverksetarahugburð í føroyska samfelagnum.
- Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlitini til at vinna pening vera góð.
- Íverksetararáðgeving skal savnast á einum stað.
- Íverksetaranetverk skulu viðurkennast og mennast og knýtast saman við onnur altjóða netverk.
- Stuðulsskipanir til serstøk menningar- og marknaðarførsluátøk skulu styrkjast.
- Ventur- og sáðkapitalmarknaðurin skal fremja føroysku íverksetarahugskotini.
- Karmar skulu skapast fyri einum venturkapitalmarknaði og granskingar- og sáðkapitalgrunnum.

## Marknaðarføring av Føroyum sum ferðamanna- og íløguland

Miðvísa arbeiðið at menna ferðavinnuna og at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland heldur áfram og fer at økjast enn meira komandi árini. Millum annað fara Ferðaráðið og ferðavinnufyritøkur at vera saman um marknaðarføringstiltøk, sum partarnir fíggja helvt um helvt.

Harumframt er farið undir miðvíst arbeiði at vekja áhugan hjá útlendskari arbeiðsmegi og útlendskum kapitali at arbeiða og vinna pening í Føroyum í samstarvi við áhugaðar partar í samfelagnum. Føroyar verða tí marknaðarførdar:

- sum eitt land, har ein kann gera íløgur í almennar fyritøkur, sum verða einskildar.
- sum eitt land, har útlendskar fyritøkur kunnu royna nýggjar kt-skipanir.
- í sambandi við frálandavinnu, aling, fiskavirking, ílegugransking, í FAS-skipanarhøpi og sum eitt skipasamskiftiskervi í Norðuratlantshavi.

Skipaður verður nýggjur stovnur, ið skal sita fyri og hava ábyrgdina av íverksetanini og marknaðarføringini. Stovnurin verður skipaður í samanleggingini av Ferðaráðnum og Menningarstovuni.

## Samferðsluætlan

Orðað visjón fyri undirstøðukervið okkara er, at menning og trivnaður í Føroyum skulu ikki avmarkast av forðingum fyri at flyta seg úr stað í stað. Undirstøðukervið skal verða so háttað, at tað er lætt, ferðslutrygt og ódýrt hjá øllum at flyta seg millum ymisk støð, bæði innanlands og millum Føroyar og útheimin. Út frá hesi visjón skulu vit seta okkum mál um atkomumøguleikar, ferðslutrygd, umhvørvi, nyttuvirði fyri samfelagið, og hvussu vit kunnu røkka hesum málum.

Av størri samferðsluætlanum kunnu nevnast útbygging av flogvøllinum og undirsjóvartunlar millum ávikavist Skálafjørðin og Havnina og Streymoynna og Sandoynna. Aðrar íløgur í undirstøðukervið verða gjørdar sambært komandi samferðsluætlan.

Fyri at menna flogferðsluna til og úr Føroyum verður miðað móti at minka ferðaavgjaldið.

## Nýggj havnalóg

Stórur tørvur er á at dagføra lógarkarmarnar um havnavirksemi, tí verandi reglur eru ófullfíggjaðar og ótíðarhóskandi. Bæði myndugleikar og havnaeigarar hava víst á tørvin á nýggjari havnalóg, sum greidliga ásetir myndugleikauppgávur og reglur annars, m.a. um havnamørk og redmørk, rakstrarformar o.a. Uppskot til løgtingslóg um havnir verður lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

## KT-nýtsla

Ferð er á fjarskiftismarknaðinum. Nýggjar fyritøkur koma fram, íløguhugurin í nýggjar tænastur og nýggj kervi er góður, og prísurin lækkar alsamt til gagns fyri brúkaran.

Visjónin er, at nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni hjá tí almenna, í skúlaverkinum og í vinnuni skal vera við til at lyfta føroyska samfelagið frá ídnaðarsamfelagi til nýskapanarsamfelag. Hetta fer at hava við sær, at øll tann føroyska vinnan kann gera seg galdandi á altjóða pallinum. Mál eru eisini orðað um kt-undirstøðukervið og um KT í skúlum, vinnulívi og hjá tí almenna. Arbeitt verður áhaldandi við at røkka hesum málum.

## Ferðslutrygd

Farnu tingsetu varð ferðslulógin broytt. Høvuðsendamálið er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í ferðsluni. Staðfest er, at ungir bilførarar eru við í meira enn helvtini av teimum ferðsluóhappum, ið hava fólkaskaða við sær. Tí verður í hesi tingsetu lagt fram uppskot at broyta ferðslulógina, har serliga verður hugsað um ungar bilførarar. Eisini verður arbeitt við eini stigaskipan fyri frádøming av koyrikortinum.

## Olja og orka

Eftir steðg í nøkur ár eru oljufeløgini aftur fús at leita eftir olju undir Føroyum. Farið er nú undir at bora fjórða brunnin á landgrunninum, og samstundis er greitt, at ein boring verður í 2007 og ein í 2008. Fleiri brunnar eru og verða eisini boraðir bretskumegin markið, so ikki kann sigast annað, enn at nógv virksemi er á Atlantsmótinum.

Vit kunnu eisini staðfesta, at fleiri føroyskar fyritøkur eru veitarar í altjóða oljuvinnuni, og at vit harumframt hava tvey føroysk oljufeløg. Hetta er einki minni enn eitt bragd, sum allar hesar fyritøkur hava framt. Oljuleitingin hevur eisini verið til mikið gagn fyri útbúgvingarverk okkara, sum hevur ment seg við nýggjum útbúgvingum og hevur avrikað fleiri Ph.D.-verkætlanir. Týdningarmikið í hesum sambandi er, at vit eisini í framtíðar útbjóðingarumførum halda fast í lógarreglunum um, at fólk, vørur og tænastur skulu um føroyskan bryggjukant og flogvøll.

Komið er væl áleiðis at orða uppskot til yvirskipaðan orkupolitikk og elveitingarlóg. Ein komandi orkupolitikkur skal m.a. seta út í kortið, hvussu føroyska samfelagið kann gerast minni bundið at oljuúrdráttum, sum standa fyri 95% av orkunýtslu okkara. Hetta kann gerast við at leggja nógv størri dent á orkusparandi tiltøk og við at gagnnýta varandi orkukeldur betur. Harumframt er neyðugt at stimbra gransking og royndarvirksemi á teimum økjum, sum orkupolitikkurin fevnir um, og at framtíðar orkuútbygging fer væl um náttúruna. Uppskot til orkupolitikk og elveitingarlóg verða løgd fyri Løgtingið í hesi setu.

## Arbeiðsmarknaður

Nýorðaða visjónin um føroyska arbeiðsmarknaðin sigur, at hann skal vera ein rúmligur, vælvirkandi, mennandi og tryggur arbeiðsmarknaður, har tað er lætt at bjóða fram og fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi. Harumframt eru mál sett fyri, hvussu vit fremja hesa visjónina.

Leingi hevur verið tosað um, hvussu vit greiða trætumál og spurningar um sáttmálabrot sum skjótast og við fyriliti fyri samfelagsligum áhugamálum. Nú hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjørt sáttmála um hesi viðurskiftini, og stovnaður er fastur gerðarrættur. Hetta er eitt rættuligt frambrot, og partarnir eiga miklan heiður uppibornan fyri hetta avrik sítt.

Ætlanin er nú, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu gera uppskot um nýggja semingslóg, ið skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin, og sum skal hóska til nútíðar arbeiðsviðurskifti og siðvenju.

Nýggj lóg um arbeiðsskaðatrygging verður løgd fyri tingið í heyst og kemur í staðin fyri vanlukkutryggingarlógina. Við hesum verður lóggávan dagførd og verður javngóð við aðrar í Norðurlondum. Nýggja uppskotið veitir munandi betri sømdir enn higartil, m.a. viðvíkjandi teimum skaðum og sjúkum, sum nú verða viðurkend sum arbeiðsskaðar. Hon fer eisini at veita betri sømdir viðvíkjandi teimum upphæddum, ið veittar verða í endurgjaldi og samsýning.

# Mentan, undirvísing og gransking

Støðið undir einum vælvirkandi samfelag er ein góð undirvísingarskipan, og mentanin er týðandi fyri trivnað og samfelagsliga menning.

## Fólkaskúli

Fólkaskúlin er grundstøðið undir allari útbúgving. Hann skal tryggja, at tey ungu gerast før fyri at útbúgva seg víðari, so at tey kunnu liva og virka í einum alsamt meira altjóðagjørdum heimi. Tí er ógvuliga neyðugt, at vit hava ein góðan fólkaskúla.

PISA-undankanningin, sum varð almannakunngjørd í vár, vísti, at føroyskir næmingar vóru ikki væl fyri fakliga, um samanborið verður við hini londini í kanningini.

Landsstýrið hevur tikið hesa niðurstøðu í størsta álvara og hevur sett sær fyri at bøta um hetta. Ein arbeiðsbólkur er settur at gera tilráðingar um tiltøk, sum eru neyðug at seta í verk. Landsstýrismaðurin hevur viðgjørt kanningina saman við øllum skúlaleiðarum í fólkaskúlanum, og breið semja er um, at vit eiga at bøta munandi um viðurskiftini í fólkaskúlanum.

Neyðugt er við størri virðing fyri arbeiðinum í fólkaskúlanum. Landsstýrismaðurin fegnast um, at landsfelagið Skúli og heim, ið er felag fyri skúlastýrislimir, er sett á stovn. Hetta gevur stórar møguleikar fyri øktum samstarvi millum heim og skúla.

Ásannast má, at tað hevur ikki til fulnar eydnast at liva upp til hugtakið ”skúlin fyri øll”. Skipanin eigur tí at verða endurskoðað til tess at bøta um umstøðurnar hjá øllum næmingum, bæði teimum, sum eru væl fyri fakliga, og hjá teimum, ið hava serligan tørv.

Størri áherðsla skal verða løgd á byrjanarundirvísingina, serliga í føroyskum og støddfrøði. Málið er, at næmingarnir læra at lesa tvey tey fyrstu skúlaárini. Umráðandi er at menna bæði lesiførleika og lesiáhuga hjá næmingunum og at skipa so fyri, at teir fáa fjølbroytt og mennandi tilfar á móðurmálinum.

Umframt fráfaringarroyndirnar er ætlanin at seta í verk støðuroyndir í t.d. 3., 5. og 7. fl. Hesar royndir kunnu vera ein liður í arbeiðinum hjá skúlunum at eftirmeta undirvísingina.

Næsta PISA-kanningin verður á vári 2009, og málið er, at Føroyar tá skulu vera komnar á hædd við hini Norðurlondini, og eisini er ætlanin tá at upplýsa, hvussu einstøku skúlarnir hava staðið seg í kanningini.

Ætlanin er at hava aðalorðaskifti á tingi um fólkaskúlan í heyst, soleiðis at tingmenn kunnu fáa høvi til at skifta orð um, hvussu okkara fólkaskúli skal verða skipaður í framtíðini. PISA-undankanningin verður partur av hesum orðaskifti, og umráðandi er, at vit taka væl umhugsaðar avgerðir og ikki fara fram í bráðræsni.

Næsta vár verður lógaruppskot um at nútímansgera læraraútbúgvingina lagt fyri tingið. Ætlanin er at skipa lærara- og pedagogútbúgvingarnar á bachelorstigi og í samsvari við felags útbúgvingarskipanina hjá ES og grannalondum okkara. Hetta verður m.a. gjørt, so at komandi lærarar og pedagogar skulu verða enn betri fyrireikaðir at taka ímóti støðugt vaksandi avbjóðingum. Næsta stig verður so at fara undir hóskandi eftirútbúgving av verandi lærarum og pedagogum.

## Sernámsfrøði

Umráðandi er, at skúlin er fyrireikaður at taka ímóti næmingum við serligum tørvi, og at lærarar verða útbúnir til hetta Gott samskifti eigur at vera millum barnagarð og skúla, soleiðis at skúlabyrjanin hjá næmingum, sum hava serliga hjálp fyri neyðini, gerst so trygg og avbjóðandi sum møguligt.

Arbeitt verður framhaldandi við at umskipa og betra ta sernámsfrøðiligu tænastuna. Skúlin á Trøðni er frá 1. januar í ár skipaður eftir egnari lóg, við egnari leiðslu og skúlastýri. Arbeiðið við at skipa samskipandi/ráðgevandi tænastueindir kring landið heldur fram. Tann fyrsta tænastueindin er sett á stovn í Eysturoynni, og leiðari og starvsfólk eru sett. Tær næstu tænastueindirnar verða skipaðar í Suðuroy og í Streymoynni.

Tænastueindin skal verða staðið, har øll foreldur kunnu venda sær, tá ið barnið hevur sernámsfrøðiligar trupulleikar. Kommunurnar eru við í tiltakinum. Tær ávísa høli og taka sær av skrivstovum og rakstri. Samskipari, sálarfrøðingur og talulærarar o.o. ráðgeva og samskipa tiltøk til børn við breki ella sernámsfrøðiligum trupulleikum. Arbeiðið verður gjørt undir leiðslu Sernámsdepilsins og í samráð við barnaverndarstovur, heilsusystrar og sosialar deildir.

## Miðnámsútbúgvingar

Málið er at tryggja, at allir næmingar fáa eina útbúgving eftir loknan fólkaskúla. Tað er av stórum týdningi at dagføra og nútímansgera miðnámsútbúgvingarnar og samstundis at skapa góðar karmar um útbúgvingarnar.

Arbeitt verður við at endurskoða tær gymnasialu útbúgvingarnar. Nevndin, ið arbeiðir við endurskoðanini, er komin væl áleiðis, og ætlanin er at hava aðalorðaskifti um tær gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, tá ið arbeiðið er liðugt seinni í hesi tingsetu. Ætlanin er at fáa størri samstarv millum útbúgvingarnar og at fáa eina liðiliga skipan, ið er lagað til okkara tørv, samstundis sum útbúgvingarnar eru góðkendar í teimum londum, har ungdómur okkara fer undir hægri lestur.

Ætlanin er eisini at fara undir eina dagføringar- og menningartilgongd av yrkisútbúgvingunum. Avvarðandi partar, t.e. vinnan, yrkisskúlarnir og myndugleikin, eru samdir um at fara undir hetta arbeiði í hesi tingsetu. Stórur tørvur er á útbúnum fólki í matvøruyrkinum, eitt nú at matgera á stovnum og matstovum. Landsstýrið ætlar framvegis at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn yrkisútbúgvingar á hesum øki, og í umbúna er eisini at lýsa tørvin á útbúgvingum í ferðavinnuni.

Tørvurin á útbúnum starvsfólki á eldraøkinum veksur, og tí er heilsurøktaraútbúgving, ið byggir á heilsuhjálparaútbúgvingina, sett á stovn fyrr í ár.

## Skúlabygging

Landsstýrið raðfestir framvegis skúlabygging frammarlaga. Samtykt er at byggja nýggjan miðnámsskúla í Marknagili, sum í fyrstu atløgu fer at fevna um virksemið hjá Tekniska skúla og Føroya handilsskúla í Havn. Løgtingið hevur eisini samtykt at byggja út Tekniska skúla í Klaksvík. Arbeiðið við Skúladepilinum í Suðuroy er nú komið so væl áleiðis, at byggibúningin er liðug, og ætlandi skal skúlin standa liðugur við árslok í 2007. Arbeiðið við at byggja Fiskivinnuskúla í Vestmanna er útboðið, og ætlanin er, at skúlin verður klárur at taka í nýtslu við árslok 2007. Samstundis hevur Løgtingið samtykt, at ábøtur verða gjørdar á Føroya studentaskúla og HF-skeið í Hoydølum. Arbeitt verður við at fyrireika karmar fyri

Vinnuháskúlan, ið er nýggja navnið á Sjómans- og maskinmeistaraskúlanum, soleiðis at alt virksemi kann vera á einum stað í framtíðini.

## Hægri lestur og gransking

Farið er undir at fyrireika eina menningartilgongd í sambandi við skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar. Ætlanin er, at útbúgvingarnar í framtíðini skulu vera á bachelorstigi, soleiðis at útbúnir skipsførarar og maskinmeistarar kunnu byggja beinleiðis víðari á sínar útbúgvingar.

Nevndin, sum arbeiðir við lærara- og pedagogútbúgvingunum, er liðug við arbeiði sítt og fer at handa landsstýrismanninum álit nú í augustmánaði. Tá ið álitið hevur fingið politiska viðgerð, verður farið undir at smíða nýggjar lógir fyri hesar báðar útbúgvingarnar.

Arbeiðið við at samskipa allar hægri útbúgvingar í ein lærustovn er byrjað. Ein arbeiðsbólkur umboðandi Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið, Sjúkrarøktarfrøðiskúlan og Læraraskúlan ger í løtuni uppskot til nýggja lóg um ein Føroya lærda háskúla. Nýggja lógin um ein lærdan háskúla skal hava uppskot um nýggjan bygnað við tí í hyggju at gera hann einfaldari og smidligari.

Arbeiðið verður framt sambært Visjón 2015, og útbúgvingarnar verða lagaðar eftir felags útbúgvingarskipanini hjá ES og grannalondum okkara.

Samskipan av gransking heldur fram, og verður Vísindaráð Føroya sett í næstum. Føroyar skulu vera millum fremstu lond innan gransking, menning og nýskapan. Hesi viðurskifti skulu samskipast soleiðis, at tað almenna og vinna ganga hond í hond innan samskipan og raðfesting. Karmar verða skaptir, sum tryggja, at gransking, menning og nýskapan fáa bestu kor.

## Útbúgvingarstuðul

Útbúgvingarstuðulsskipanin verður nú endurskoðað við støði í samgonguskjalinum, og lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið seinni í heyst. Ætlanin er m.a. at betra um korini hjá lesandi við børnum og at gera eina barnsburðarfarloyvisskipan.

## Mentan

Føroysk mentan er fjølbroytt og sterk og megnar uttan iva at taka við teimum avbjóðingum, sum koma við alheimsgerðini. Men ávirkanin uttanífrá økist í hvørjum, og tí er neyðugt at vera á varðhaldi, tí samstundis sum alheimsgerðin kann hava fyrimunir við sær, so er eyðsæð, at avbjóðingarnar fyri eina so lítla tjóð sum okkara eru stórar – ikki minst tá ið vit hugsa um mentan og mál okkara. Hetta krevur tí ein mentanarpolitikk við greiðum málum og ítøkiligum uppskotum um, nær og hvussu vit røkka málunum. Arbeitt verður við hesum spurningum í bólkinum, sum hevur ábyrgd av mentanarpartinum í Visjón 2015. Málini eru løgd fyri visjónstorgið, og nú verður farið at orða verksetanarætlan samsvarandi.

Málstevnunevndin, sum er sett sambært løgtingssamtykt, er farin undir týdningarmikla starv sítt at orða ein almennan málpolitikk, og hetta arbeiði fer uttan iva at vera til mikið gagn fyri mál og mentan okkara.

Landsstýrismaðurin hevur sett bólk at endurskoða virksemið hjá Filmseftirlitinum. Bólkurin er komin væl áleiðis við arbeiðinum at gera uppskot til eina nýggja lóg um eitt Miðlaráð, sum heimilar ráðnum at flokka filmar og annars veita leiðbeining og kunning til almenningin. Uppskotið verður væntandi liðugt í heyst.

Uppskot til lóg um stuðul til ítróttaranlegg verður lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetuni.

Upphavsrættarøkið verður í dag røkt í Danmark, og Føroyar hava ikki egna lóg á økinum. Ætlanin er at skipa økið við lóg og hava myndugleika av økinum í Føroyum.

Nýggj kringvarpslóg er samtykt, og samanleggingartilgongdin heldur fram. Ætlanin er at byggja aftur at verandi útvarpshúsi, og verður uppskot til verkslagslóg lagt fyri Løgtingið í heyst.

### Musikkskúli

Játtanin til musikkskúlaskipanina er munandi hækkað, og í 2007 verður næmingatalið kring landið um 2.200. Útbúgving á miðnámsstigi er byrjað, og frá august 2006 ganga 16 næmingar á eini trýára miðnámsútbúgving í musikkskúlaskipanini. Í august næsta ár verður næmingatalið 24. Her ber til hjá næmingum at fyrireika seg til víðari útbúgving, meðan teir enn eru í Føroyum. Arbeitt verður við at endurskoða lógina um musikkskúla.

### Fólkakirkja

Á ólavsøku næsta ár verður fólkakirkjan føroyskt málsøki.

Samráðingarnar við danir eru av, samstarvssáttmáli verður undirskrivaður í næstum, og uppskot til føroyskar lógir eru í gerð. Hoyringarbólkur ger viðmerkingar, áðrenn lógirnar fara til almennar hoyringar. Lógararbeiðið skal vera liðugt í góðari tíð, og ætlandi verða øll lógaruppskotini løgd fyri tingið í ár. Komandi vetur verða týdningarmestu kunngerðirnar gjørdar, so at føroyska skipanin er klár á ólavsøku næsta ár, tá ið yvirtøkan verður framd.

### Norðurlendskt mentanarsamstarv

Næsta ár fara stórar bygnaðarbroytingar fram í tí norðurlendska mentanarsamstarvinum. Føroyar hava verið umboðaðar í teimum arbeiðsbólkum, ið hava arbeitt við tí nýggja bygnaðinum, og tí skuldu føroysk áhugamál verið tryggjað í hesi nýggju skipanini. Tað er tó ikki óhugsandi, at byrjanartrupulleikar vera, og Mentamálaráðið er sjálvsagt til reiðar at veita føroyskum mentanarlívi ráðgeving og stuðul í hesum sambandi. Av tí at bygnaðarbroytingarnar fara at elva til øktan tørv á ráðgeving og vegleiðing til listafólk og mentanarstovnar, verður neyðugt at hækka játtanina til LISA.

Ætlanir eru um at byggja upp í Norðurlandahúsið. Landsstýrið fegnast um hetta og fer at átaka sær sín part av fíggingini av hesi ætlan.

## Almanna- og heilsumál

### Visjónir, mál og mið

Vælferðarsamfelagið stendur fyri stórum avbjóðingum. Teirra millum eru tað fíggjarliga trýstið, sum alheimsgerðin leggur á búskapin, og tey vaksandi krøvini hjá einstaklingum, familjum og arbeiðsmarknaði til góðar og smidligar almannatænastur. Hetta setir stór krøv til politisku skipanina, men ein kós er nú løgd, og á flestu almanna- og heilsumálsøkjum eru grundleggjandi stevnumið orðað, so at vælferðin hjá øllum føroyingum skal verða betri tryggjað og ment. Í visjónsarbeiðinum fyri vælferðarøkið fram til 2015 er fyri fyrstu ferð

orð sett á, hvussu vit vilja skipa og menna vælferðarsamfelag okkara í framtíðini - eisini á økjum, har politisk mál og mið ongantíð áður eru orðað um vælferðarmál í langtíðarhøpi.

Nógv er framt á almanna- og heilsuøkinum seinastu árini, eisini við at betra og tryggja um reglugrundarlagið. At so er, eru fækkandi viðmerkingarnar hjá landsgrannskoðanini um hesi viðurskifti týðiligt dømi um. Og tó, so trokar alt meira á við at endurskoða alla almanna-lóggávuna.

Niðanfyri eru nevnd tey høvuðsøki, sum Almanna- og heilsumálaráðið hevur sett sær fyri at arbeiða við komandi tingsetu. Visjón 2015 er við í at kalla øllum ætlanum.

## Vælferðarráð

Ætlanin er at fara undir at skipa eitt vælferðarráð. Ráðið skal m.a. vera við til at menna orðaskiftið um vælferðarpolitiskar spurningar í Føroyum, skal gera viðmerkingar, seta kanningar í verk, umrøða avleiðingar av førdum politikki í einum langtíðarhøpi og veita ráð um prinsippiellar, etiskar og søguligar tættir í vælferðarorðaskiftinum.

## Familjupolitisk átøk

Landsstýrið fer at fremja eina røð av familjupolitiskum átøkum. Parturin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum snýr seg m.a. um:

- at tryggja tímaløntum løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum lutvíst endurgjald fyri inntøkumiss í sambandi við arbeiðsfráveru orsakað av barnsins fyrsta og øðrum sjúkudegi. Tímalønt á privata arbeiðsmarknaðinum hava ikki henda sáttmálabundna rætt. Ætlanin er at seta hetta í verk við broytingum í sjúkradagpengalógini í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.
- at skipa eitt ráðgevandi toymi fyri kvinnur. Hugsanin er, at henda ráðgeving skal fevna um upplýsing um fyribyrging, viðtalu við kvinnur, ið umhugsa ella hava fingið fosturtøku, og ráðgeving til barnakonur og stakar uppihaldarar, ið liva undir truplum viðurskiftum og hava tørv á serligum stuðli.

Harumframt eru familjupolitisk átøk í umbúna hjá øðrum landsstýrismonnum. At nevna eru t.d. umlegging av barnafrádráttinum í skattinum til útgjald, hækkaður barnastuðul til forsyrgjarar við láginntøkum, hækkaður studningur til lesandi forsyrgjarar og lógarfesting av felags foreldrarætti.

## Eldrapolitisk átøk

Á eldraøkinum fer Landsstýrið eisini at fremja fleiri tiltøk. Arbeiðið hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum snýr seg m.a. um:

- Stuðul at byggja eldrabúpláss: Fyri at nøkta meginpartin av tí stóra tørvinum á eldrabúplássum, verður nú farið undir ta stóru verkætlanina, sum tey næstu 2-3 árini kann fara at geva 136 nýggj búpláss á røktarheimum og eldrasambýlum. Til hetta endamál eru givnar fíggjarligar tilsagnir á góðar 50 mió. kr. til samans.
- Ókeypis koppseting: sum eitt felags eldra- og fólkaheilsupolitiskt átak skulu allir fólkapensjonistar fáa tilboð um ókeypis koppseting móti beinkrími.

Av eldrapolitiskum málum hjá øðrum landsstýrismonnum er ætlanin m.a. at hækka pensjónina. Við øktum inngjaldi í samhaldsfasta eftirlønargrunnin, ber til at hækka útgjaldið úr grunninum næstan 800 kr. um mánaðin frá 1. jan. 2007. Eitt annað pensjónspolitiskt tiltak verður at hækka serligu viðbótina til ávísar pensjonistar. Endamálið við hesum er at bøta um ta stóru oljukostnaðarhækkingina, sum rakar pensjonistar hart.

## Bústaðarpolitisk ætlan

Umframt omanfyrinevndu átøk, verða nú eisini fyrstu partarnar av bústaðarpakkanum hjá samgonguni settir í verk. Ítøkiliga snýr tað seg um, at tvey lógaruppskot verða løgd fyri Løgtingið, eitt um lutaíbúðafeløg og eitt um bústaðapartafelag.

Lógin um lutaíbúðafeløg skal bæði verða karmur um vanlig lutaíbúðafeløg og serlig lutaíbúðafeløg, ið eru ætlað at standa fyri bústøðum til fólk við serligum tørvi. Við at skipa privatar bústaðir sum vanlig lutaíbúðafeløg fáa fólk við láginntøkum betri møguleikar at seta føtur undir egið borð. Somuleiðis fáa eldri fólk høvi at skifta hús síni um við minni bústaðir. Harvið verður skapt eitt størri umskifti á bústaðamarknaðinum, sum m.a. hevur við sær, at fleiri sethús verða tøk hjá ungum barnafamiljum.

Lógin um bústaðapartafelag fer at skipa Húsalánsgrunnin og Íbúðagrunnin í eitt alment bústaðapartafelag, sum skal fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi. Samstundis verður Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin avtikin, og nýggja partafelagið skal veita avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk til fólka- og fyritíðarpensjónistar, sum búgva í egnum bústaði.

## Rehabilitering

Tveir arbeiðsbólkar eru um at vera lidnir við arbeiðið at lýsa viðgerðarviðurskiftini hjá teimum ymsu sjúklingabólkunum. Ein ráðleggingarbólkur skal síðan gera eitt samlað uppskot um, hvussu vit bøta og skipa viðgerðartilboð okkara, og hvussu vit samskipa tey við viðgerðir uttanlands. Talan verður um eina nýggja, føroyska rehabiliteringsskipan, og miðað verður ímóti, at arbeiðið skal verða liðugt í juni komandi ár.

## Rúmligur arbeiðsmarknaður

Ynski Landsstýrisins er, at fólk við skerdum førleika skulu gerast partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum, har til ber. Til tess eru gjørdar almennar skipanir við endurbúgving og vardum størvum, og Almannastovan hevur við eini arbeiðsmarknaðardeild lagt dent á at styrkja hesar skipanir. Hóast hesar skipanir er tað ein sannroynd, at tað er torført hjá slíkum fólki at koma á arbeiðsmarknaðin. Tað er eisini sannroynd, at fólk sleppa mangan ikki upp í part longur, tá ið tey fáa brek ella sjúku seinni í lívinum. Fyri at bøta um hesi viðurskifti er neyðugt at seta munagóð tiltøk í verk. Ein styrkt arbeiðsmarknaðardeild á Almannastovuni skal tí vera karmur um eina serliga verkætlan, ið skal fáa fleiri fólk við skerdum førleika á arbeiðsmarknaðin, umframt at hon skal fyribyrgja, at fólk missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Ætlanin er, at tilskundanin til at arbeiða harumframt skal betrast við at lækka mótrokningina í pensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%. Frá 1. januar 2007 skal inntøkuloftið hjá lægstu fyritíðarpensjónistum harumframt hækkast, og hjá hægstu fyritíðarpensjónistum skal tað lækkast.

Við støði í hesum politisku tiltøkum verður miðað eftir, at lægsta fyritíðarpensjón verður avtikin 1. januar 2009.

## Sjúkrahúsverk

Arbeitt verður alsamt við at menna umstøðurnar at viðgera sjúklingar í Føroyum. Eitt týdningarmikið stig á leiðini varð tikið, tá ið Løgtingið í vár samtykti uppskot til løgtingslóg um at høvuðsumvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið. Við hesum eru fastir karmar fingnir um

byggingina, so at Landssjúkrahúsið kann gerast eins gott sum sjúkrahús í grannalondum okkara, tá ið ræður um kanningartilboð, viðgerðartilboð, trygd og hentleikar. Hetta stuðlar eisini upp undir tær ætlanir, sum landsstýrismaðurin hevur um rehabilitering og psykiatri.

Ein arbeiðsbólkur, sum hevur arbeitt við áliti um framtíðar heilsuverk, leggur í hesum døgum seinastu hond á arbeiði sítt. Álitið vísir m.a. á, hvussu vit kunnu skipa og gagnnýta tey trý sjúkrahúsini í sjúkrahúsverki okkara, og tað viðger eisini, hvussu vit kunnu samskipa tað primera og sekundera heilsuverkið betur. Ætlanin er at leggja hetta álit fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis í heyst.

## Heildarpsykiatri

Í nógv ár hava trupulleikar verið á psykiatriska økinum. Hetta kemst millum annað av, at vit hava hvørki havt økispsykiatri ella sosialpsykiatri, og hetta hevur ovbyrjað sjúkrahús-psykiatriina á Landssjúkrahúsinum.

Seinastu árini hevur støðugt verið arbeitt við at skipa allar partar av psykiatriini betur - at gera eina heildarpsykiatri í Føroyum. Økispsykiatri er sett í verk, og ætlanin er at menna hana komandi árini. Innan sosialpsykiatriina er stuðulsskipan fyri sinnisveik sett á stovn, sambýli til sinnisveik eru fingin til vegar og bygginevnd er sett at fyrireika búpláss til brúkarar, ið hava serligan tørv á hjálp.

Psykiatriski depilin hevur eisini arbeitt við at dagføra viðgerðartilboðini, m.a. við at leggja meira um til ambulantar viðgerðir, gera viðgerðarætlanir fyri sjúklingar, dygdarmenna viðgerðarskipanina o.a. Landsstýrismaðurin hevur eisini fingið undirtøku í Landsstýrinum og samgonguni fyri at byggja økisdepil í Suðuroy fyri sinnisveik, har sosialpsykiatrisk og økispsykiatrisk tilboð verða samskipað.

Hóast psykiatriin hevur verið fyri munandi framstigum seinastu árini, er enn langt á mál. Gerast skal nýggj psykiatrilóg, sum tryggjar rættindini hjá sálarsjúkum betur enn galdandi lóg frá 1938. Útbyggingin av sosialpsykiatriini og økispsykiatriini skal halda fram, og barna-, ungdóms- og eldrapsykiatriskar tænastur skulu setast á stovn. Hesi mál hevur visjóns-bólkurin eisini stungið út í kortið, og miðað verður eftir at fremja málini komandi árini.

## Fólkaheilsa

Sjøtul er av álvara settur á arbeiðið at betra um heilsu okkara. Tá ið "Fólkaheilsuætlan føroyinga – ein liður í Visjón 2015" var til aðalorðaskiftis á tingi í vár, fekk hon sera góða undirtøku. Ætlanin er gjørd sum liður í Visjón 2015, men er serliga ítøkilig fyri árini 2006-2009.

Fólkaheilsupolitikkurin skal miða eftir at styrkja almennu heilsustøðu føroyinga. Hann skal eggja til heilsugóða lívsførslu, menna heilsufremjandi viðurskifti og fyribyrgja sjúkuelvandi og heilsuskaðiligar umstøður sum heild í samfelagnum.

Landsstýrið ásannar, at tá ið ræður um fólkaheilsu, ber ikki til at gera øll tiltøk í senn. Tí hevur Landsstýrið sett sær fyri, at komandi árini verður dentur í høvuðsheitum lagdur á at fáa fólk at eta heilsubetri mat, at røra seg meira, roykja minni og at minka um rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsluna.

Setningur Landsstýrisins í sambandi við fólkaheilsuætlanina er eisini at fáa allar partar í samfelagnum at taka undir við eini heildarætlan. Hetta er ein fyritreyt, um fólkaheilsupolitikkurin skal eydnast.

Komandi ár verður peningur avsettur til serlig átøk fyri øktari likamsrørslu og heilsugóðum mati, átøk móti royking og tilboð til fólk um fyribyrgjandi heilsukanningar.

## Barnaverndarlóg

Nýggja barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006 og hevur nú virkað í eitt hálvt ár. Tá ið lógarøki verður umskipað, gongur altíð nakað av tíð at byggja økið upp og at fáa skipanirnar at virka eftir ætlan. Fleiri skipanir undir barnaverndarlógini virka tó longu avbera væl, men enn er lógin ikki fullgóð, og onkur skipan er heldur stirvin.

Í barnaverndarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin eftir fimm árum skal leggja frágreiðing fyri tingið um, hvørt lógin virkar sum ætlað ella eigur at verða broytt. Enn er ikki umliðið, men hugsanin er longu nú at gera onkrar skipanir eitt sindur smidligari, so at tær skulu virka betur. Hesi broytingaruppskot verða løgd fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

## Heimleys

Tá ið landsstýrismaðurin legði uppskot til samtyktar fyri Løgtingið í seinastu tingsetu um eitt nú almenn bútilboð til heimleys, heitti tingið á hann at leggja ítøkiligt lógaruppskot um heimleys fyri aftur á heysti 2006. Hetta lógaruppskot fer at byggja á uppskotið til samtyktar.

## Sjúkrakassalóg

Nýggj sjúkrakassalóg verður gjørd í samráði við Meginfelag sjúkrakassa Føroya og aðrar partar. Við nýggju lógini er ætlanin at leggja teir 11 núverandi sjúkrakassarnar saman í ein felags sjúkrakassa fyri allar Føroyar. Hetta fer ikki bert at geva betri fyrisiting, men fer eisini at geva sjúkrakassaskipanini høvi at fremja nýggj mál í sambandi við sjúkufyribyrging. Allir landsins borgarar fáa eitt sjúkratryggingarkort at nýta í Føroyum sum uttanlands. Eftirlitið við sjúkrakassunum verður samstundis savnað hjá einum myndugleika.

## Talgilding á almanna- og heilsuøkinum

Á heilsuøkinum verður arbeitt við fleiri verkætlanum, sum við talgilding skulu betra um heilsuverkið sum heild. Tann stóra talgilda heilsuskipanin er um at verða liðugt royndarkoyrd, og tá ið komið er nakað inn í næsta ár, fer hon at virka í øllum heilsuverkinum. Tað líður eisini væl við at talgilda røntgen, rannsóknarstovu og aðrar partar av heilsuverkinum, og tá arbeiðið er liðugt, fara allar hesar skipanir at kunna samskifta. Tær fara tí at gera sítt til at røkka visjónini um hitt samskipaða, talgilda heilsuverkið.

Hetta árið er eisini brotið upp úr nýggjum við talgilding á almannaøkinum, og annað er í umbúna. Heimarøktin og Serforsorgin hava fingið nýggja, sermenta kt-skipan, sum einfalt savnar saman og viðger upplýsingar í sambandi við heimarøkt. Viðvíkjandi Almannastovuni er ætlanin at leggja fyri tingið uppskot um verklagslóg um nýggja kt-skipan fyri allan stovnin. Verkætlanarbólkur er við at leggja seinastu hond á forarbeiðið, sum skal stuðla upp undir hetta lógaruppskot.

## Ílegusavn

Løgtingslóg um gransking í mannaílegum (ílegulógin) varð samtykt í fjør. Í vár varð stjóri settur, og 1. juni fór stovnurin formliga at virka. Ílegusavnið fyrireikar nú ættarbandsskránna, ið skal verða ættartræ føroyinga. Í fyrstu atløgu fer tað at røkka um 20. øld og partar av 19. øld. Skráin verður væntandi gjørd í samstarvi við Landsskjalasavnið og aðrar

stovnar. Fyriskipanir verða eisini lagdar til rættis fyri diagnosu- og vevnaðarskráir, ið ætlandi verða mentar í stigum, har hvørt ílegusavn ger sínar sáttmálar um at granska í skráunum.

### Apoteksverk

Arbeiðsbólkur hevur greinað virksemið hjá apoteksverkinum og hevur nýliga latið landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum áhugaverda frágreiðing og tilmæli um framtíðar bygnað fyri apoteksverkið. Tilmælið byggir á, at vit mega tryggja okkum, at vit hava atgongd til neyðugan heilivág, at vit hava góðan heilivág og heilivágstænastur, og at vit hava skynsama heilivágsnýtslu. Harumframt eiga vit at menna apoteksskipanina sambært heilivágsætlanini 2015.

Løgtingslóg um at dagføra heilivágsframleiðsluna hjá Apoteksverkinum varð samtykt í vár. Við henni gevast karmar til at menna og víðka heilivágsframleiðslu í Føroyum, og vit kunnu somuleiðis svara fyri neyðugu veitingartrygdini til borgaran.

## Innlendismál

### Útlendingamál

Eitt av teimum málum, ið hevur verið nógv umrøtt seinasta árið, er útlendingamálið.

Nú alt vanligari er at búgva í øðrum londum í styttri ella longri tíð, ofta av arbeiðsávum, er neyðugt at hava greiðar reglur um hetta og at umsita hesar reglur væl og smidliga.

Frammi hevur verið, at viðgerðin av umsóknum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum hevur verið ov drúgv. Landsstýrið hevur tikið hetta til eftirtektar og hevur sett sær fyri at greiða trupulleikarnar.

Danski ráðharrin í integratiónsmálum og landsstýrismaðurin í innlendismálum hava tí avtalað at gera greiðari mannagongdir fyri málsviðgerðina og at áseta tær í kunngerð. Ætlandi verða hesar mannagongdir lidnar í heyst.

Landsstýrið heldur bestu loysnina vera, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir meta um, hvørt tørvur er á flyta inn arbeiðsmegi til Føroya. Stovnað verður tí eitt arbeiðsmarknaðarráð við nevndu pørtum, sum skulu ráðgeva Innlendismálaráðnum um tørvin á hesum øki.

Á fíggjarlógini fyri 2006 hevur Løgtingið sett av kr. 500.000 at útgreina útlendingamál.

Landsstýrið setti í 2004 ein bólk við umboðum úr øllum flokkum á tingi at lýsa útlendingaøkið, men arbeiðið hevur ligið stilt í longri tíð. Ætlanin er at fáa gongd á tað aftur, í fyrstu atløgu við at knýta tað saman við arbeiðinum at gera skjótari og greiðari mannagongdir fyri málsviðgerðina av útlendingamálum.

Umsóknirnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi gerast eisini alt fleiri. Frá 1. januar til 1. juni í 2006 komu uml. 270 slíkar umsóknir afturímóti uml. 90 somu tíð í fjør. Afturat hesum skulu leggjast aðrar umsóknir um uppihaldsloyvi, t.d. familjusamanføringar, sum vóru uml. 45 frá 1. januar til 1. juni 2006.

### Tinglýsing

Tinglýsingin varð yvirtikin 1. februar 2006, men enn er sumt at fáa í rættlag. Serliga tøkniviðurskifti.

Fyri yvirtøkuna var tinglýsingin partur av donsku edv-tinglýsingini. Við yvirtøkuni varð gjørd ein fyribilsskipan, so at føroyingar framhaldandi kunnu nýta donsku skipanina, tó við teirri trygdartreyt, at tinglýsingin enn sum áður heldur til í hølunum hjá Føroya rætti.

Danir fáa nýggja tinglýsingarskipan 1. januar 2008, og tá fara føroyingar burtur úr skipanini. Neyðugt er tí at gera føroyska skipan at taka í nýtslu í seinasta lagi 1. januar 2008.

Løgtingið játtaði í vár pening at kravfesta slíka skipan, og arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst. Tá fæst at síggja, hvat skipanin kostar. Ætlanin er at bjóða arbeiðið at gera føroysku edv-tinglýsingarskipanina út, tá ið játtan er fingin til hennara.

## Landsfólkayvirlit

Landsfólkayvirlitið er nú partur av Innlendismálaráðnum.

Í vár hava Innlendismálaráðið og umboð fyri kommunufeløgini arbeitt við uppskoti um nýggja lóg um landsfólkayvirlit. Eftir ætlan verður uppskotið lagt fyri Løgtingið í heyst. Endamálið við uppskotinum er at dagføra lógina um fólkayvirlit, so at nýmótans tøkni kann nýtast at skráseta og veita upplýsingar úr skránni hjá fólkayvirlitinum.

Nýggja lógin fer at nágreina heimildir og skrásetingarreglur hjá fólkayvirlitinum, og hon fer eisini at nágreina reglurnar um at útflýggja upplýsingar. Endamálið við lógini er harumframt at fremja nýggja norðurlendska sáttmálan um fólkaskráseting, ið væntandi kemur í gildi í heyst. Í hesum sambandi skal nýggj telduskipan mennast. Henda skipan verður nú kravfest, og tá ið lógin er samtykt, er ætlanin at fáa játtan til at menna hana.

## Fjølmiðlaábyrgdarlóg

Málsøkið fjølmiðlaábyrgd varð yvirtikið í vár. Løgtingslógin um fjølmiðlaábyrgd kom í gildi 1. juli í ár og fer úr gildi 1. juli 2007. Landsstýrismaðurin skal sambært álitinum frá rættarnevndini í góðari tíð frammanundan koma við uppskoti um, hvussu ein kann greiða ábyrgdarspurningin í sambandi við Kringvarp Føroya.

## Navnalóg

Tørvur er á at endurskoða ásetingarnar í navnalógini, tá ið kallað verður upp í ættini. Reglurnar í kunngerðini um hetta verða tí settar inn í lógina. Sama verða reglurnar um, nær tilknýtið til bústaðar- ella húsanøvn er so tætt, at ein kann hava tey sum eftirnavn.

## Vallóg

Vallógin verður nú endurskoðað, og í samstarvi við Løgtingsskrivstovuna er fundur ásettur tann 18. august í ár at kunna løgtingslimir um málið. Landsstýrið ætlar tó ikki at endurskoða reglurnar í vallógini um valdømisuppbýtið á hesum sinni. Í staðin verður strongt á at leggja nýggja útrokningarháttin og nakrar tekniskar broytingar í vallógini fyri tingið tíðliga í heyst.

## Sjálvbodnar kommunusamanleggingar

Ætlanin er at dagføra lógina um sjálvbodna kommunusamanlegging, tí mett verður, at tíðin er komin at gera eintýdda áseting um, hvørjar tær kommunalu eindirnar skulu vera, antin talan verður um samstarv ella samanlegging. Samstundis er tørvur á lógargrundarlagi, ið heimilar at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanleggingar við støði í tilmæltu kommunalu eindunum.

## Familjurættarlóggáva

Í vár samtykti Løgtingið ríkislógartilmæli um ættleiðing, og í heyst er ætlanin at leggja fyri Løgtingið uppskot til ríkislógartilmæli um foreldramyndugleika og samveru. Sama er ætlanin við uppskoti til ríkislógartilmæli um nýggja verjamálslóg.

## Útoyggjamál og Strandfaraskip landsins

Innlendismálaráðið hevur í góðum samstarvi við SEV, oljufeløgini og Fiskimálaráðið arbeitt við at greiða spurningin um oljuflutning til útoyggjar, og nú røkist fyri, at tað kemst undir land við hesum máli.

Farmaleiðir vórðu einskildar í vár. Í hesum sambandi hevur verið frammi, at tænastan í útoyggj er versnað, og Innlendismálráðið ætlar tí at endurskoða flutningsstuðulsskipanina til útoyggjar.

Á samferðsluøkinum hava verið stórbroytingar, nú Norðoyatunnilin er upplatin og Farmaleiðir eru einskildar. Tí er vert at kanna, um vit eiga at gera tillagingar á samferðsluøkinum.

## Kunngerðablað og kunngerðasavn

Seinastu sløku tvey árini hevur Innlendismálaráðið arbeitt við at menna nýggjan lógardátugrunn. Arbeiðið er komið so mikið áleiðis, at skipanin kann setast í verk í heyst. Hon er so háttað, at til ber at seta lógarkunngerðir í dátugrunnin, og tí fer verandi kunngerðablað at kunna talgildast.

Við skipanini verður eisini gjørligt at seta fráboðanir frá almennum myndugleikum, t.d. Føroya rætti ella Skráseting Føroya, í lógardátugrunninum. Ætlanin er tí at endurskoða lógina um alment kunngerðablað. Neyðugt verður tó at taka málið upp við ríkismyndugleikarnar, av tí at ríkislóggáva verður sett í gildi í Føroyum.

## Umhvørvismál, lendismál og náttúrumál

Í frágreiðing um náttúru- og umhvørvisvernd, sum arbeiðsbólkur læt úr hondum í 2001 og sum var til aðalorðaskiftis á Løgtingi, varð mælt til at skipa eina felags náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting.

Frágreiðingin hevur síðan verið grundarlag undir arbeiðinum at styrkja umsitingina av nevndu økjum. Visjónsbólkurin 2015, ið viðger hesi øki, tekur eisini undir við hesi felags fyrisiting, og arbeitt verður tí framhaldandi við hesi ætlan.

Nú Hoyvíkssáttmálin er samtyktur, verður loyvt at flyta inn einnýtisíløt. Innlendismálaráðið og umboð fyri vinnuna arbeiða tí við eini hóskandi panti- og innsavningarskipan, sum skal setast í verk skjótast gjørligt. Í hesum sambandi verður neyðugt at broyta lógina um einnýtisíløt.

# PARTUR III

## Løglisti

**Mál, ið ætlanin er at leggja fram í hesi tingsetu**

## Løgmansskrivstovan

**Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:**

- **Frágreiðing løgmans um uttanríkismál**
  Árliga frágreiðing løgmans um uttanríkismál verður nú uppafturtikin. Frágreiðingin hevur sum endamál at kunna Løgtingið um árliga virksemi Føroya á uttanríkispolitiska økinum, umframt at boða frá áleikandi átøkum í framtíðini.

**Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:**

- **Uppskot til løgtingslóg um altjóða menningarsamstarv**
  Lógin um altjóða menningarsamstav fer úr gildi 30. juli 2007. Tí verður nýtt uppskot lagt fyri Løgtingið í hesi setu.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum**
  Lógin verður løgd fyri tingið, so hvørt málsøkini kirkja, vinnufelagslóggáva og tilbúgving verða yvirtikin.

- **Uppskot til samtyktar um at dagføra NEAFC- millumlandasáttmálan**
  Endamálið er at dagføra sáttmálan.

## Fíggjarmálaráðið

**Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:**

- **Uppskot til løgtingslóg um Landsbanka Føroya**
  Ætlanin er at leggja uppskot um nýggja lóg um Landsbanka Føroya fyri Løgtingið.

- **Uppskot til løgtingslóg um Hagstovu Føroya**
  Ætlanin er at leggja uppskot um nýggja lóg um Hagstovu Føroya fyri Løgtingið.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
  Ætlanin er at fremja ymiskar tillagingar og broytingar í skattalógini.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingar-lógin)**
  Ætlanin er at halda fram við at veita skattalætta, soleiðis sum semjan millum samgongu-flokkarnar sigur. Ymiskar tillagingar verða eisini gjørdar í lógunum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um meirvirðisgjald og løgtingslóg um framleiðslu og innflutning**

Ætlanin er at gera tillagingar í punktgjøldunum og í meirvirðisgjaldslógini. Ætlanin er eisini at tillaga mvg-lógina til bústaðarpolitikkin hjá samgonguni. Fyri at styrkja eftirlitið við vørum og tænastum er ætlanin at gera tillagingar í tolllógini.

- **Hjálpisáttmálar**
  Ætlanin er, at Føroyar skulu gerast partur av OECD-hjálparavtaluni í sambandi við skattamál.

- **Uppskot til lóg um skrásetingargjald á motorakførum**
  Ætlanin er at broyta skrásetingargjaldið til eitt umhvørvisgjald.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um ferðagjald**
  Ætlanin er at gera tillagingar í lógini.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at gera dagføringar í "anordning nr. 86 af 10. februar 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed"**
  Ætlanin er at dagføra lóggávuna.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at gera dagføringar í anordning nr. 87 af 10. februar 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om værdipapirhandel m.v.**
  Ætlanin er at dagføra lóggávuna, soleiðis at hon er í samsvar við donsku lóggávuna.

## Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Tvískattasáttmálar**
  Tvískattasáttmálar verða gjørdir við:
  - Bretland
  - Háland
  - Italia

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi "lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme" í gildi fyri Føroyar**
  Galdandi lóggáva um hvítvask varð sett í gildi fyri Føroyar við ríkislógartilmæli í 1997. Ætlanin er at endurskoða og dagføra lóggávuna.

- **Uppskot til løgtingslóg um at fyribyrgja fígging av yvirgangi og hvítvaski av vinningi**
  Ætlanin er at gera uppskot til løgtingslóg um tiltøk ímóti hvítvaski o.ø. fyri yvirtikin málsøki.

- **Uppskot til løgtingslóg um eftirlønarskipan**
  Ætlanin er at gera uppskot til eftirlønarskipan, sum við tíðini áleggur øllum borgarum at gjalda til egna pensjónsskipan.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um at skatta inntøkur av kolvetnisvirksemi**
  Ætlanin er at gera ymiskar tillagingar í lógini.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**
  Ætlanin er at tillaga lógina til bústaðarpolitikkin hjá samgonguni.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta lóg um toll- og skattafyrisiting**
  Ætlanin er at endurskoða skipanina við Toll- og skattaráði Føroya.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um skattligar avskrivingar o.t.**
  Ætlanin er at gera eina roknskapartøkniliga endurskoðan av lógini.

## Fiskimálaráðið

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:

- **Uppskot til løgtingslóg um áseting av fiskidøgum**
  Endamálið er at taka partin um áseting av fiskidøgum úr lógini um vinnuligan fiskiskap og seta hann í serstaka løgtingslóg, sum síðan kann verða tillagað á hvørjum ári. Á henda hátt slepst undan at leggja uppskot um at broyta løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap fyri tingið á hvørjum ári.

- **Uppskot til løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**
  Endamálið er at leggja fram nýtt og endurskoðað uppskot til løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

- **Uppskot til løgtingslóg um fiskileiðir og friðingar o.a.**
  Endamálið er at taka partarnar um áseting av fiskileiðum og friðingum úr lógini um vinnuligan fiskiskap og seta teir í serstaka løgtingslóg, tí hesir partar venda sær ikki beinleiðis til vinnuna, men eru at meta sum ytri karmar. Reglurnar verða samstundis endurskoðaðar.

- **Uppskot til løgtingslóg um fiskiskap í áum, vøtnum, ósum og løkum**
  Endamálið er at fáa betri hóskandi reglur á økinum. Verandi lóg um vinnuligan fiskiskap heimilar landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at gera reglur fyri fiskiskapi eftir laksi og sílum, hóast talan er ikki um vinnuligan fiskiskap.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um brunatrygd**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar um brunatrygd, m.a. í sambandi við at fáa ment tilbúgvingina í Føroyum.

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Uppskot til løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar um mánaðarligan minstaforvinning til útróðrarmenn.

- **Uppskot til løgtingslóg um manning av skipum**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar um manning av skipum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um skráseting av skipum**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar um skráseting av skipum sum avleiðing av broyttari FAS-skipan.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um Føroyska altjóða skipaskrá**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar sum avleiðing av broyttari FAS-skipan.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um trygd á sjónum**
  Endamálið er at broyta revsirættarligu mannagongdina í sambandi við brot á lógina um trygd á sjónum.

## Vinnumálaráðið

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:

- **Uppskot til løgtingslóg um talgildar undirskriftir**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at fremja trygga nýtslu av talgildum undirskriftum.

- **Uppskot til løgtingslóg um heimild at einskilja P/F Føroya tele**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at heimila landsstýrismanninum at selja partar av Føroya tele ella alt felagið.

- **Uppskot til løgtingslóg um kapping**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at skapa karmar fyri einari virknari kapping og einum virknum eftirliti.

- **Uppskot til ríkislógartilmælir um ársroknskap, partafeløg, smápartafeløg og vinnurekandi grunnar**
  Ríkislógartilmælini hava til endamáls at dagføra og tillaga galdandi lógir til altjóða reglur.

- **Uppskot til løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða**
  Ætlanin við lógaruppskotinum er at dagføra og tillaga reglurnar á økinum, so at tær eru í samsvari við lóggávuna í øðrum Norðurlondum.

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Uppskot til løgtingslóg um marknaðarføring**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at áseta minstukrøv til marknaðaratferðina hjá vinnufyritøkum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um ferðslu**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at eggja ungum bilførarum til at koyra tryggliga, so at vit fáa færri óhapp við fólkaskaða.

- **Uppskot til løgtingslóg um trygging**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at frælsisgera tryggingarmarknaðin í Føroyum.

- **Uppskot til løgtingslóg um havnir**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at nútímansgera karmarnar fyri havnavirksemi.

- **Uppskot til løgtingslóg um seming**
  Lógaruppskotið skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin og skal hóska til nútíðar arbeiðsmarkna okkara og siðvenju.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um aling**

  Lógaruppskotið skal dagføra karmarnar við atliti at vinnuligu og tøkniligu menningini á økinum.

- **Uppskot til løgtingslóg um elveitingarlóg**
  Eitt endamálunum við uppskotinum til elveitingarlóg er at skipa økið í nútímans karmar og at útvega neyðugar heimildir at stýra viðurskiftum, sum hava týdning fyri framleiðslu, flutning og sølu av el-orku.

- **Aðalorðaskifti um orkupolitikk**

Ein komandi orkupolitikkur skal m.a. seta út í kortið, hvussu føroyska samfelagið kann gerast minni bundið at oljuúrdráttum, sum standa fyri 95% av orkunýtslu okkara. Hetta kann gerast við at leggja nógv størri dent á orkusparandi tiltøk og við at gagnnýta varandi orkukeldur betur. Harumframt er neyðugt at stimbra gransking og royndarvirksemi á teimum økjum, sum orkupolitikkurin fevnir um, og at framtíðar orkuútbygging fer væl um náttúruna.

## Mentamálaráðið

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:

- **Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um skúlafyrisiting**
  Við teimum lógum, sum lýstar eru síðan yvirtøkuna av skúlaverkinum, er innihaldið í lógini stigvíst avtikið, og tí verður lógin sett úr gildi.

- **Uppskot til løgtingslóg um filmseftirlit**
  Endamálið er at umskipa Filmseftirlitið til ein eftirlits-, ráðgevingar- og kunningarstovn.

- **Uppskot til løgtingslóg um stuðul til ítróttaranlegg**
  Endamálið er at skipa studningin til ítróttaranlegg við lóg.

- **Uppskot til verklagslóg um at víðka útvarpshúsið til kringvarpshús**
  Endamálið er at savna virksemi Kringvarpsins undir einari lon.

- **Uppskot til løgtingslóg um limaskap í kirkjuni og at loysa sóknarband**
  Lógaruppskotið er um, hvussu ein verður tikin upp sum limur í fólkakirkjuni og hoyrir til kirkjusókn, um hvussu ein loysir sóknarband til prest í aðrari kirkjusókn, og hvussu limaskapur endar.

- **Uppskot til løgtingslóg um at brúka kirkjur, kirkjuráð og próstadømisráð**
  Lógaruppskotið er um reglur fyri, hvussu kirkjur kunnu verða nýttar, og hvør hevur ræði á teimum, og um hvussu kirkjuráð og próstadømisráð skipa seg og virka.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjulig val**
  Lógaruppskotið er um, hvussu kirkjuráð og próstadømisráð verða vald.

- **Uppskot til løgtingslóg um hægstu stjórn kirkjunnar**
  Lógaruppskotið er yvirskipað um, hvussu viðurskiftini eru millum kirkjumyndugleikarnar, og um, hvussu hægstu embætini í kirkjuni verða mannað.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjubygningar**
  Lógaruppskotið er um, hvussu kirkjubygningar verða umsitnir og vardir, og hvussu farið verður fram, verður kirkja bygd ella avtikin.

- **Uppskot til løgtingslóg um fíggjarviðurskifti kirkjunnar**
  Lógaruppskotið er um, hvussu kirkjan verður fíggjað: hvussu kirkjuskattur verður ásettur og líknaður, meginreglur fyri stuðulin úr landskassanum, og hvussu tikið verður móti gávum. Harafturat snýr uppskotið seg um, hvussu kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn sita fyri ognum og rakstri kirkjunnar.

- **Uppskot til løgtingslóg um størv í kirkjuni**
  Lógaruppskotið er um, hvussu prestur verður kallaður og settur, hvørji størv kirkjuráðið annars kann seta, og hvussu kirkjuráðið kann samsýna teimum, sum ikki eru í starvi, men røkja størri uppgávur í kirkjuni.

- **Uppskot til løgtingslóg um útbúgvingarstuðulsskipan**
  Endamálið er m.a. at gera eina barnsburðarfarloyvisskipan og at betra um korini hjá forsyrgjarum.

- **Aðalorðaskifti um fólkaskúlan**
  Endamálið við orðaskiftinum er at fáa at vita, hvørjar hugsanir tingmenn hava um, hvussu skúli okkara skal verða skipaður í framtíðini. PISA-undankanningin og tilráðingarnar frá einum PISA-átaksbólki verða partar av hesum orðaskifti.

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um fólkaskúlan**
  Endamálið við uppskotinum er at fáa ásetingar um, hvussu farast skal fram í setanarmálum, tá ið skúlaleiðarin er ógegnigur, og at útvega heimildir fyri framhaldandi økissetan av lærarum.

- **Uppskot til løgtingslóg um Lærdan háskúla og um samskipan av hægri útbúgvingum**
  Endamálið við uppskotinum er at samskipa ávísar hægri útbúgvingar í Føroya lærda háskúla.

- **Uppskot til løgtingslóg um læraraútbúgving**
  Endamálið er at nútímansgera útbúgvingina og skipa hana á bachelorstigi.

- **Uppskot til løgtingslóg um pedagogútbúgving**
  Endamálið er at nútímansgera útbúgvingina og skipa hana á bachelorstigi.

- **Aðalorðaskifti um miðnámsútbúgvingar**
  Endamálið er at fáa orðaskifti um, hvussu gymnasialu miðnámsútbúgvingar eiga at verða skipaðar í framtíðini. Álitið frá nevndini, ið endurskoðar gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, verður partar av hesum orðaskifti.

## Almanna- og heilsumálaráðið

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um kommunulæknaskipan**
  Ætlanin er at nútímansgera starvssetanina av kommunulæknum við at leggja hana beinleiðis undir setanarmyndugleikan, sum er landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum. Í hesum sambandi missir Ráðið fyri kommunulæknaskipanina einastu eftirverandi formellu uppgávu sína. Landsstýrismaðurin heldur, at neyðugt er ikki við slíkum ráði til at tryggja samskiftið við feløgini, ið har eru umboðað, t.e. Kommunulæknafelag Føroya, Meginfelag sjúkrakassa Føroya og bæði kommunufeløgini. Landsstýrismaðurin hevur tí ætlan um at fáa undirtøku fyri at taka av Ráðið fyri kommunulæknaskipanina.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum**
  Sum er, viðger kærunevndin í almannamálum allar kærur um upptøku til eldrabústovnar í Sandoynni. Almanna- og heilsumálaráðið er kærumyndugleiki í málum, sum viðvíkja restini av landinum. Landsstýrismaðurin ætlar tí at fáa undirtøku fyri at leggja øll slík kærumál til kærunevndina í almannamálum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**

Inntøkuloftið hjá hægstu og lægstu fyritíðarpensjónistum er í dag hitt sama. Hetta vil landsstýrismaðurin broyta, so at inntøkuloftið frá 1. januar 2007 hækkar hjá lægstu fyritíðarpensjónistum og lækkar hjá hægstu fyritíðarpenjónistum,. Hvussu nógv er enn ikki avgjørt.

- **Uppskot til broyting í løgtingslóg um almannapensjónir**
  Ætlanin er at betra um tilskundanina at arbeiða við at lækka mótrokningina í fyritíðarpensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%.

- **Uppskot løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
  Broytingin í dagstovnalógini skal heimila landsstýrismanninum at áseta gjaldsreglur á dagstovnaøkinum. Heimild var í barnaforsorgarlógini, sum fór út gildi 1. januar 2006, men henda heimild er ikki í dagstovnalógini.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um almenna forsorg**
  Ætlanin er at gera nakrar broytingar í forsorgarlógini. Ein broyting er, at brúkari av stuðulsskipanini fyri vaksin kann varðveita persónliga stuðulin, hóast hann er vorðin 67 ár. Treytin er, at brúkarin fær gagn av stuðlinum, at hann við øðrum orðum framvegis kann liva eitt virkið lív. Onnur broyting er at fáa greiðari ásetingar um, hvat hjálparráð fevnir um. Eitt nú hevur Kærunevndin í almanna- og heilsumálum víst á, at siðvenjan at játta bústaðarbroytingar ikki hevur greiða lógarheimild, og umráðandi er at fáa slíka heimild. Ein triðja broyting skal áseta rættin til bútilboð við lóg. Við uppskotinum verður m.a. ábyrgdin fyri bútilboðum til heimleys løgd til kommunurnar.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna (tubbakslógin)**
  Endamálið við hesi lóg er at tryggja øllum rættin til at liva og virka í roykfríum umhvørvi. Hetta verður gjørt við støðugt at víðka um økið, har ikki er loyvt at roykja. Í lógaruppskotinum verður serliga hugsað um børnini og tey ungu, og dentur verður lagdur á at forða fyri, at tey fara at roykja.

- **Aðalorðaskifti um framtíðar heilsuverk**

## Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Uppskot til løgtingslóg um lutaíbúðafeløg**
  Henda lóggáva er partur av bústaðarpakkanum, sum samgongan hevur avgjørt at seta í verk.

- **Uppskot til løgtingslóg um at umskipa Húsalánsgrunnin o.a. til alment partafelag**
  Samgongan hevur avgjørt, at Húsalánsgrunnurin, Íbúðagrunnurin og Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin skulu leggjast saman og umskipast til alment partafelag. Nýggja bústaðarpartafelagið skal fíggja bústaðir til fólk við serligum bústaðartørvi og veita avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk til pensjónistar í egnum bústaði.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans**
  Endamálið er at broyta skipanina, so at tey, sum eru ringast fyri fíggjarliga og hava størsta tørvin á heilivági, skulu rinda minst, samstundis sum útreiðslurnar til heiligvág minka.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág**
  Ætlanin er at gera broytingar í løgtingslógini sum áseta, at Apoteksverkið í framtíðini verður stovnur, sum liggur uttan fyri løgtingsfíggjarlógina. Í hesum sambandi verður neyðugt at gera neyvar reglur fyri heimildir og ábyrgdir fyri Apoteksverkið, eftirlit við virkseminum hjá stovninum, umframt aðrar ásetingar, sum eru neyðugar fyri at stovnurin kann leggjast út um løgtingsfíggjarlógina.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
  Broytingin í dagstovnalógini skal heimila landsstýrismanninum at áseta gjaldsreglur á dagstovnaøkinum. Heimild var í barnaforsorgarlógini, sum fór út gildi 1. januar 2006, men henda heimild er ikki í dagstovnalógini.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg barnavernd**
  Ætlanin er at gera fleiri broytingar í barnaverndarlógini. Ein broying skal heimila landsstýrismanninum at heinta inn gjøld, ið áløgd eru sambært lógini, til dømis uppalingarískoyti. Kunnu hesi gjøld ikki innheintast, verður ov lítil neyðsyn hjá gjaldsskyldugum at gjalda tey. Onnur broyting skal gera tað lættari og skjótari hjá foreldrum at kæra. Einasta orsøk til, at núverandi kærumyndugleiki er Føroya Rættur, er, at tað er høvuðsbarnaverndarnevndin, sum tekur avgerð um gjaldið. Triðja broyting skal stytta um málsviðgerðartíðina. Familjuviðgerð er ókravd, og familja kann tí ikki tvingast í viðgerð. Einasta orsøk til núverandi áseting um, at høvuðsbarnaverndarnevndin skal taka avgerð um familjuviðgerð, er, at landið ber útreiðslurnar av henni. Fjórða broyting skal fáa heimildina hjá landsstýrismanninum at samsvara við restina av greinini. Orsøkin til ósamsvarið er helst, at § 39, stk. 1 og 2 í lógaruppskotinum varð broytt, uttan at heimildin í stk. 3 varð broytt samvarandi.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans**
  Endamálið er at broyta skipanina, so at tey, sum eru ringast fyri fíggjarliga og hava størsta tørvin á heilivági, skulu rinda minst, samstundis sum útreiðslurnar til heiligvág minka.

- **Broyting í løgtingslóg um dagpening**
  Endamálið er tryggja tímaløntum arbeiðstakarum á privata arbeiðsmarknaðinum lutvíst gjald fyri inntøkumiss í sambandi við arbeiðsfráveru orsakað av barnsins 1. og 2. sjúkudegi.

## Innlendismálaráðið

### Mál, ið ætlanin er at leggja fram í heyst:

- **Uppskot til løgtingslóg um fólkayvirlit**
  Í sambandi við at nýggjur norðurlendskur sáttmáli um fólkaskráseting kemur í gildi í heyst, er neyðugt at dagføra lógina um fólkayvirlit, bæði fyri at tryggja, at upplýsingarnar í skipanini eru rættar, og fyri at nýmótans tøkni skal kunna nýtast at skráseta og veita upplýsingar úr skránni hjá fólkayvirlitinum. Lógin kemur í staðin fyri løgtingslógina um fólkayvirlit frá 1982.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um fólkanøvn**
  Endamálið er at tillaga ásetingarnar í lógini um at kalla upp í ættini. Harnæst skal ásetast, nær tilknýti til eitt bústaðar- ella húsanavn er so tætt, at ein kann fáa loyvi til navnið.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um val til Føroya løgting**
  Endamálið við uppskotinum er at broyta útrokningarháttin, tá ið løgtingsval verða uppgjørd.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar**
  Endamálið við uppskotinum er at áseta kommunueindir, ið kunnu samstarva ella leggja saman, og at heimila fólkaatkvøðum um samanleggingar.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um einnýtisíløt**
  Endamálið við uppskotinum er at taka av forboðið um at flyta inn til Føroya einnýtisíløt og at staðfesta reglur um innsavningarskipan.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at broyta "Lov om pas til danske statsborgere m.v."**
  Endamálið við broytingini er at minka um passgjaldið hjá børnum, av tí at børn ikki longur kunnu verða innskrivað í passið hjá foreldrunum, men skulu hava egið pass.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um "Lov om voldgift"**
  Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi "lov om voldgift," sum varð sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan í 1975.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um "Lov om forældremyndighed og samvær"**
  Endamálið er at seta donsku lógina um foreldramyndugleika og samveru í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um "Værgemålsloven"**
  Endamálið er at seta donsku "værgemålsloven" í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

## Mál, ið ætlanin er at leggja fram í vár:

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um alment kunngerðablað**
  Ætlanin er at talgilda kunngerðasavnið og at taka av kunngerðablaðið í pappírsformi. Fyri at fremja hesa ætlan, er neyðugt at broyta lógina um alment kunngerðablað.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um fjølmiðlaábyrgd**
  Endamálið við uppskotinum er at greiða ábyrgdarspurningin í mun til Kringvarp Føroya.